á Løgtingsins fíggjarlóg 1985/86 til at fíggja rakstrarhall felagsins í sama tíðarskeiði.

Ungdómslandsfelag Føroya var játtað 95.500,00 kr. á Løgtingsins fíggjarlóg 1984/85, og einans við hjálp av hesi upphædd hevur tað eydnast at gera U.L.F. til ein virknan tænastustovn fyri limafeløg og ungdóm í Føroyum, sum felagið hevur til endamál.

Fyri framhaldandi at halda hetta tænastustøði vóna vit, at tí verður víst vælvild, og at umsóknin fær eina sakliga viðgerð.

Fíggjarætlan
fyri
Ungdómslandsfelag Føroya
1985/1986

		Útreiðslur	Inntøkur
1.	Limagjald		20.000,00
2.	Skrivstova	50.000,00	
3.	Norðurlendskt samstarv	13.000,00	
4.	Skeiðvirksemi	37.000,00	
5.	Ráðgevandi virksemi	20.000,00	
6.	Landstiltøk	40.000,00	35.000,00
7.	Skipanarligt virksemi	30.000,00	30.000,00
8.	Rakstrarhall		105.000,00
9.	Javnvág	190.000,00	190.000,00

Viðmerkingar
til
fíggjarætlanina 85/86

1. *Limagjald:*
U.L.F. hevur 8 limafeløg við umleið 1000 limum tilsamans. Feløgini gjalda 20,00 kr. pr. lim í teirra felag. 1000 × 20 = 20.000,00 kr.

2. *Skrivstovan:*
Á heysti 1983 eydnaðist tað felagnum at seta á stovn skrivstovu í Klaksvík. Hendan hevur verið til ómetaligt gagn, og kemur framyvir at verða kjarnan í felagsarbeiðnum.

Útreiðslurnar eru sundurgreinaðar soleiðis:

1. leiga, el, hiti	29.000,00 kr.
2. Pappír/margfaldan	8.000,00 —
3. Telefon	6.000,00 —
4. Lýsingar	3.000,00 —
5. Frímerkir, porto o.a.	4.000,00 —
Útreiðslur íalt	50.000,00 kr.

3. *Norðurlendskt samstarv:*
U.L.F. hevur neyvt samstarv við Norra og Ísland, við tað at ein samarbeiðis avtala er gjørd landanna millum. Eisini við Svøríki, Finland, Áland, Grønland og Danmark hava vit regluligt samstarv.

Tann 27. okt. í ár gerast vit limir av NSU (Nordisk Samarbeidsorganisation for Ungdomsarbeid), sum hevur 1.2 mill. limir í øllum norðanlondum.

4. *Skeiðvirksemi:*
Ungdómslandsfelag Føroya hevur nú gjørt eina skeiðætlan fyri heystið 84 og várið 85. Talan er um 6 skeið, sum fevna yvir:

Roknskaparlæru
Samskifti
Felagsrætt (lógir o.a.)
Fyrisiting
Ítrivskapan (hvussu ítriv í lokalfeløgunum verða skapt)
o.s.fr.

Skeiðini verða hildin av fakfólki fyri at fáa sum mest burturúr.

Skeið og útbúgving í felagsarbeiði verður ein fastur táttur í arbeiðnum hjá U.L.F. framyvir.

5. *Ráðgevandi virksemi:*
Felagið vil bjóða limum sínum eina ráðgeving í felagsarbeiði og rakstri, eins og tá nýggj feløg verða sett á stovn, ella broytingar í feløgum fara fram.

Hetta krevur ofta nógva ferðing eins og tilfarsútreiðslur.

6. *Landstiltøk:*
Felagið skipar á hvørjum ári fyri ymiskum felagstiltøkum eitt nú eini summarlegu. Hesi tiltøk eru í ein stóran mun sjálvfíggjandi, við tað at luttakararnir eins og aðrir stovnar og fyritøkur gjalda tað, tað kostar. Tó eru útreiðslurnar størri enn inntøkurnar.

7. *Skipanarligt virksemi:*
Landsfundur og teir tveir umboðsráðfundirnir árliga í felagnum kosta rættuliga fitt, men her fíggja vit hetta við tiltøkum, sum fara fram um sama mundi.

8. *Rakstrarhall:*
Sum tað framgongur av fíggarætlanini 85/86 verður eitt rakstrarhall uppá 105.000,00 kr., sum søkt verður um at fáa fíggjað á Løgtingsins fíggjarlóg.

Ungdómslandsfelag Føroya hevur eitt krevjandi ár fyri framman bæði í virksemi og fíggjarliga, við tað at 1985 er lýst at vera altjóða ungdómsár av Sameindu Tjóðum (ST).

Longu nú er felagið farið at fyrireika seg, eitt nú er í samarbeiði við L.F.Ú. fyrireikingar í gongd til eina blaðútgávu.

Men vit síggja við spenningi og áræði fram til hetta og vóna, at tað fíggjarliga eisini fer at verða í lagi, soleiðis at tað ikki kemur at darva okkum fyri ikki at siga steðga virkseminum hjá Ungdómslandsfelagi Føroya.

Viðmerking frá landsstýrinum:
Landsstýrið skjýtur upp, at veitt verður

Landsfelag Føroyinga í útbúgving (L.F.Ú.)	120.000 kr.
Ungdómsfelag Føroya (U.F.)	100.000 —
	220.000 kr.

Ad § 15 — 15109 Føroya Landsbókasavn
Sbrt. skriv dagfest 10. oktober 1984:

Kontonummar og navn		Roknskapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot lands-stýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
103048	Løn/tænastumenn	212.727	200.9	231.5	231.5	233.0	235.0
103143	Løn/starvsfólk	1.027.179	1.110.6	1.406.6	1.033.2	1.131.6	1.231.6
103168	Løn/sáttmálalønt	241.519	252.1	260.4	260.4	268.0	278.0
103122	Løn/reingerð	99.242	104.8	120.9	120.9	130.0	140.0
103268	Løn/onnur	86.876	117.0	143.0	143.0	145.0	150.0
113102	Ferða- og dagpening innanl.	0.0	1.2	1.2	1.2	2.0	2.0
113243	Ferða- og dagpening uttanl.	11.612	0.0	0.0	0.0	0.0	0.0
133053	Fólkatrygging	2.530	4.0	4.0	4.0	4.0	4.0
213105	El, hiti og vask	134.667	211.4	218.0	218.0	221.0	224.0
213503	Umsiting	28.853	30.0	45.0	45.0	56.0	56.0
213702	Ognartrygging	23.397	26.0	26.0	26.0	28.0	28.0
223204	Flutningur	7.433	9.0	10.5	10.5	12.0	14.0
233051	Innbúgv	36.332	40.0	315.0	315.0	100.0	60.0
233155	Prentlutir	5.392	18.0	18.0	18.0	20.0	20.0
233259	Postgjald	22.792	20.0	35.0	35.0	37.0	40.0
233354	Telefon og telex	21.864	25.0	37.5	37.5	39.0	42.0
233409	Leiga av maskinum	20.006	30.0	30.0	30.0	30.0	30.0
233561	Aðrar skrivstovuútreiðslur	17.344	19.0	20.0	20.0	22.0	24.0
253085	Bókakeyp og innbinding	371.526	408.0	480.0	480.0	510.0	525.0
253903	Aðrar útreiðslur	2.335	6.0	6.0	6.0	6.0	6.0
	Tilsamans	2.373.626	2.633.0	3.408.6	3.135.2	2.994.6	3.109.6

Viðmerkingar:

103048 Løn/tænastumenn
Landbókavørðurin verður løntur í 31. lønarflokki

Løn juli 1984: 18.700,33×12	224.4
3 dýrtíðarviðbøtur á 105 kr.	3.7
1,5% frítíðarløn	3.4
	231.5

103143 Løn/starvsfólk
Roknað er við lønini pr. 01.07.1984 + 3 dýrtíðarviðbótum á 105 kr. + 1,5% frítíðarløn.

a)	1 fyrsti bókavørður	18. lønarfl.	4 st.	
	Hevur orlov til 1/10-85. Lønin í ½ ár verður			85.0
	Hin helvtin verður brúkt til avloysara á konto 103288/Løn onnur.			
b)	1 bókavørður	20. lønarfl.	9. st.	186.9
c)	1 bókavørður	15. lønarfl.	6. st.	163.5
d)	1 bókavørður	15. lønarfl.	2. st.	155.6
e)	1 bókavørður (nýtt)	15. lønarfl.	1. st.	153.6
f)	1 skrivari	12. lønarfl.	4. st. 37/42	130.6
g)	1 hjálparfólk	15. lønarfl.	7. st.	165.4
h)	1 hjálparfólk	9. lønarfl.	14 st.	155.6
i)	1 hjálparfólk	9. lønarfl.	14. st.	155.6
j)	1 skrivstovufólk (nýtt)	7. lønarfl.	1. st.	119.8
				1.471.6
÷	endurgjald frá bókasøvnum			65.0
	Løn/starvsfólk tilsamans			1.406.6

Bókavørður b og hjálparfólk g eru, orsakað av nógv øktum arbeiðsuppgávum, farin úr ávikavist 30/42 og 37/42 upp á fullan dag í sept. 1984. Søkt verður um at fáa hesa arbeiðstíð og normering góðkenda. Viðkomandi hjálparfólk, Marjun Berg, er á endaløn í 12.lønarflokki, men eigur at verða flutt upp í 15. lønarfl. vegna serligt ábyrgdarøki, serkunnleika og dugnaskap í langari tænastu. Ábyrgd og arbeiði hennara vaksa í stórum í sambandi við økta tilfarskeypið og skrásetingararbeiðið til bygda- og skúlabókasøvnini og til bókabilskipanina. Av somu orsøkum verður neyðugt við 2 nýggjum fólkum afturat: bókavørður e og skrivstovufólk j eru nýggj størv, sum søkt verður um. Sí viðmerkingar til 15202-373106. Normeraða 1/2 dags starvið til bókbindara/konservator, sum ikki er sett, verður at bíða, so játtan kann fáast til omannevndu starvssetanir.

103168 Løn/sáttmálaløn

Vísindabókavørðurin er løntur eftir sáttmála við donsku Magisterforeningen. Løn juli 1984: 20.365,00

+ 1,5% frítíðarløn	248.0
Mett lønarhækking	12.4
	260.4

103222 Løn/reingerð

2 fólk á 60 t. á 62,24 kr. = 7.468,80 um mánaðin	90.0
Mett lønarhækking	6.8
Høvuðsreingerð, avloysarar, vindeygavask	24.1
	120.9

103288 Løn/onnur

Vegna orlov hjá starvsfólki hevur verið neyðugt við fleiri avloysarum, enn roknað var við. Fyrsti bókavørðurin hevur játtaða orlov til 1. oktober 1985. Tann soleiðis sparda lønin í ½ ár verður í staðin løgd afturat her til avloysara.

Avloysarar og frítíðaravloysarar (85.0+25.0)	110.0
Húsavørður	7.0
Urtagarðs- og annað bønarmansarbeiði	26.0
	143.0

213105 El, hiti og vask

Streymnýtsla 70.000 kwt. á 1,50 kr.	105.0
kw gjald	1.0
Ljósrør v.m.	6.0
Olja 32.000 l á 3,00 kr.	96.0
Eftirlit við hitaverki og ljósi	2.5
Vask	7.5
	218.0

213503 Umsiting

Málaraarbeiði	40.0
Annað	5.0
	45.0

233051 Innbúgv

Farast má undir at fáa til vega tær í byggiætlanini nevndu kompaktreólir til goymsluna. Sambært yvirslag	310.0
Annað innbúgv	5.0
	315.0

233354 Telefon og telex

Nýtslan er nú yvir 2.500 kr. pr. mánað.
Roknað er við 2.500 kr. pr. mánað, sum nýtslan er + 25% í hækking 37.5

253085 Bókakeyp og innbinding

Krøvini um størri bókakeyp eru vaksandi. Nú farið verður undir at lata bókabil við 4.000 bókum koyra út á bygdirnar, verður neyðugt við eyka

bókakeypi, serliga av barnabókum, fyri um 30.000 kr. I komandi ári er harumframt roknað við einari príshækking upp á 10% í miðal.

Viðmerkingar landsstýrisins:
Ikki tikið við í uppskoti landsstýrisins:

1 bókavørð	153.600 kr.
1 skrivstovufólk	119.800 kr.
	273.400 kr.

Ad § 15 - 15202 Fólkabókasøvn
Sbrt. skriv dagfest 10. oktober 1984:

Kontonummar og navn		Roknskapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87 í 1000 kr.	Ætlan 1987/88 í 1000 kr.
253011	Umsjón	1.550	4.0	4.0	4.0	4.0	4.0
253202	Rithøvundasamsýning .	60.506	72.2	79.0	79.0	79.0	79.0
253219	Bygging & nýstovning ..	—	625.0	—	—	—	—
253227	Bókabiltænasta	—	225.0	220.0	220.0	220.0	220.0
nýggj konto	Skúlabókasøvn, nýstovning	—	—	440.0	440.0	440.0	440.0
nýggj konto	Skúlabókasøvn rakstrarstudningur	—	—	72.0	72.0	72.0	72.0
373106	Fólkabókasøvn, rakstrar-studningur	2.150.043	2.687.8	3.149.8	3.149.8	3.149.8	3.149.8
	Tilsamans	2.212.099	3.614.0	3.964.8	3.964.8	3.964.8	3.964.8

253202 *Rithøvundasamsýning*

Upphæddin er sambært § 8 í bókasavnslógini ásett at svara til 2,5% av játtanini til fólkabókasøvnini. Her verður mælt til eisini at rokna samsýningina eftir studninginum til skúlabókasøvnini. — Í 1983/84 vóru 64 rithøvundar, sum skriva á føroyskum, umboðaðir í bókasøvnunum við 5.846 bókum. Gjaldið pr. bók var 10,35 kr.

253219 *Bygging og nýstovning*

Ongar ítøkiligar upplýsingar um byggiætlanir eru innkomnar.

253227 *Bókabiltænasta*

Koyringin í Eysturoynni og Streymoynni byrjar ætlandi í december 1984.

Rakstrarútreiðslurnar verða:

Leiga av bili í 7 mánaðir	90.000 kr.
Løn til bilførara	98.700 kr.
Koyriútreiðslur: 3.500 l av olju á 3,00	10.500 kr.
Telefon og aðrar útreiðslur	20.800 kr.
Tilsamans	220.000 kr.

Ætlanin er, at ein við landsbókasavnið settur bókavørður røkir bókabiltænastuna, sí viðmerkingar til 15109-103143.

nýggj konto *Skúlabókasøvn, nýstovning*

Landsskúlafyrisitingin heldur, at eini 18 skúlabókasøvn verða stovnsett í 1985, 8 í skúlum við framhaldsdeildum og 10 við smærri skúlar. Skotið verður tí upp at játta 30.000 kr. til hvørt av teimum 8 og 20.000 kr. til hvørt av teimum 10 til stovnseting og keyp av grundstovni.

nýggj konto *Skúlabókasøvn, rakstrarstudningur*

Her uppií er roknað við 4 skúlabókasøvnum, sum eru í

gongd, men sum higartil ikki hava fingið landskassastuðul til raksturin. Tilfarskeypið hjá teimum verður mett til tilsamans 120.000 kr. í 1984/85. Landskassastudningurin fyri 1985/86 verður so 60% av hesi upphædd. Heimildini viðvíkjandi verður víst til viðmerkingina til § 15 15202/373106 í fíggjarløgtingslóg fyri 1984/85: *Rakstrarstudningur verður eisini at galda skúlabókasøvn.*

373106 **Fólkabókasøvn, rakstrarstudningur**

Yvirlitið niðanfyri er sett upp eftir fíggjarætlanini hjá hvørjum savninum sær. Bókasøvn, ið eisini eru skúlabókasøvn, eru sum vant tikin við her.

	Ætlaður rakstur 1984/85	Studningur 1985/86
a. Bókasavnið í Nes kommunu ..	37.000	22.200
b. Býarbókasavnið, Tórshavn	3.500.000	2.100.000
c. Eiðis bókasavn	10.000	6.000
d. Fuglafjarðar bókasavn	495.000	297.000
e. Glyvra bókasavn	76.000	45.600
f. Klaksvíkar bókasavn	666.000	399.600
g. Kollafjarðar bókasavn	66.700	40.020
h. Leirvíkar bókasavn	57.000	34.200
i. Sandavágs-Miðvágs bókasavn, Giljanes	58.000	34.800
j. Sunda bókasavn, Oyri	11.000	6.600
k. Sørvágs bókasavn	47.000	28.200
l. Tvøroyrar bókasavn	80.000	48.000
m. Vágs bókasavn	87.000	52.200
n. Vestmanna bókasavn	66.000	39.600
Tilsamans	5.256.700	3.154.020

Landsstýrinum er sent uppskot til lóg um serligan stuðul til føroyska bókaútgávu. Eftir hesum uppskoti skal landskassin keypa upp í 200 eintøk av hvørjari føroyskari bók, sum hevur almennan áhuga, og sum er egnað til bókasavnsbrúk. Sammett við bókaútgávuna í 1982 hevði talan í mesta lagi verið um 660.000 kr. 18 bøkur til børn og 25 til vaksin fyri tilsamans 3.300 kr. í einum eintaki.

Ætlanin er at býta bøkurnar út ókeypis til bókasøvnini sum part av landskassastudninginum.

Fyri bókaútgevaran er tað av alstórum týdningi at fáa peningin fyri tey fyrstu 200-300 eintøkini skjótast gjørligt eftir útgávudagin. Tiltakið skuldi ikki darvað bókasøluni annars, tí ætlandi ganga einir 3-4 mánaðir, áðrenn keyptu bøkurnar eru fingnar klárar til útláns á bókasøvnunum.

Verður uppskotið samtykt, eiga 720.000 kr. at verða settar av til endamálið á fíggjarlógini 1985/86. Samstundis kann játtanin til fólka- og skúlabókasavnsraksturin lækkast við um 100.000 kr.

Viðmerkingar til:

Uppskot til lóg um serligan stuðul til føroyska bókaútgávu

Fyri bókaútgevaran, sum ofta er rithøvundurin sjálvur, er tað av størsta týdningi at fáa peningin fyri tey fyrstu 200-300 seldu eintøkini skjótast gjørligt eftir útgávudagin — helst fyrr.

Landsbókasavnið og hini almennu bókasøvnini keypa sjálvsagt føroyskar bøkur í fittliga stórum tali í tann mun, bøkurnar eru egnaðar, og sum peningajáttanin er til. Størri helmingurin av bókakeypinum verður sum er goldin av landskassastudninginum. Men ofta ganga fleiri mánaðir, frá tí ein bók er útkomin, til hon verður keypt av bókasøvnunum. Endamálið við uppskotinum er tí at fáa hesar bøkur keyptar straks, helst longu meðan tær eru í gerð, fyri á tann hátt stuðla útgávuni munabetri enn higartil. Kortini verða altíð nakrir mánaðir, til bøkurnar verða klárar til útláns á bókasøvunum, so tað skuldi ikki darvað bókasøluni annars.

Av tí at bæði fólka- og skúlabókasøvn verða við í skipanini, eigur ein trímannanevnd við landsbókavørðinum, einum umboði valdum av landsskúlafyrisitingini og einum av landsstýrinum valdum umboði millum

bókavørðir við fólkabókasøvnini at stíla fyri keypi og býti av bókunum. Ætlanin er, at bøkurnar verða latnar almennu bókasøvnunum sum partur av landskassastudninginum.

Í 1982 komu út 25 bøkur til vaksin og 18 barnabøkur, sum kunnu sigast at vera egnaðar til bókasavnsbrúk. Tær kostaðu tilsamans knappar 3.300 kr. í einum eintaki í bókabúðum. Høvdu allar verið keyptar í 200 eintøkum, kostaðu tær 660.000 kr. Játtanin til fólka- og skúlabókasøvnini hevði samstundis kunnað verið lækkað við um 100.000 kr.

Uppskot til lóg um serligan stuðul til føroyska bókaútgávu

§ 1

Landsbókasavninum verður heimilað av serligari játtan á fíggjarløgtingslógini árliga at keypa upp í 200 eintøk av hvørjari føroyskari bók, sum hevur almennan áhuga og er egnað til bókasavnsbrúk.

§ 2

Landsbókavørðurin, ein av landsskúlafyrisitingini valdur limur og ein av landsstýrinum valdur limur millum bókavørðir á fólkabókasøvnunum avgera, hvørjar bøkur og hvussu mong eintøk av hvørjari bók koma undir § 1.

2. stk. Teir valdu limirnir verða valdir fyri 4 ár.

§ 3

Landsstýrið ger serligar reglur um virki nevndarinnar og um, hvussu bøkurnar skulu býtast út til almennu bókasøvnini.

§ 4

Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1985.

ad § 15 — 15304 Føroya Landsskjalasavn
Sbrt. skriv dagfest 8. oktober 1984:

Kontonummar og navn Rakstrarstað 15304		Roknskapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
103143	Løn - starvsfólk	440.0	541.5	925.0	925.0	925.0	925.0
103168	Løn — sáttmálaløn	272.0	239.0	242.0	176.0	176.0	176.0
113202	Ferða- og dagp. innanl. ...	25.2	10.0	10.0	10.0	10.0	10.0
113243	Ferða- og dagp. uttanl.	0.00	0.0	0.0	0.0	0.0	0.0
213105	El, hiti og vask	6.8	60.0	70.0	70.0	70.0	70.0
213408	Umvælingar	4.9	130.0	65.0	65.0	65.0	65.0
213806	Leiguútreiðslur	17.3	110.5	110.5	110.5	110.5	110.5
233051	Innbúgv	22.0	65.0	135.0	135.0	135.0	135.0
233155	Prentlutir	6.4	20.0	20.0	20.0	20.0	20.0
233259	Postgjald	2.5	2.0	5.0	5.0	5.0	5.0
233354	Telefon	22.6	15.0	20.0	20.0	20.0	20.0
233561	Aðrar skrivstovuútr.	29.6	20.0	30.0	30.0	30.0	30.0
253085	Bókakeyp og -innbind.	5.4	3.0	5.0	5.0	5.0	5.0
253505	Konservering	0.0	50.0	50.0	50.0	50.0	50.0
253521	Flyting — skjalasøvn v.m. .	2.1	5.0	5.0	5.0	5.0	5.0
253538	Pakkitilfar v.m.	8.8	10.0	15.0	15.0	15.0	15.0
253546	Útgáva, keldur	0.0	50.0	50.0	50.0	50.0	50.0
253554	Skráseting	7.0	10.0	10.0	10.0	10.0	10.0
253562	Vísindaligar kanningar	0.0	25.0	25.0	25.0	25.0	25.0
000000	Kopitól, kopiering		00.0	36.0	36.0	36.0	36.0
000000	Tryggingar		00.0	10.0	10.0	10.0	10.0
000000	Útreiðslur í sambandi við flyting		00.0	50.0	50.0	50.0	50.0
			1.266.0	1.687.5	1.521.5	1.521.5	1.521.5

ad konto 103143 Løn starvsfólk
Arbeiðið á savninum er nógv vaksið hesi seinastu árini. Hetta stendst av, at ógvuliga stórar nøgdir av ogvuliga stórar nøgdir av skjølum eru latnar savninum í varðveitslu frá almennum og privatum stovnum síðan 1980.

Til tess at skráseta og skipa hetta tilfar og til at skipa fyri gransking í gomlum bókum og skjølum er sera umráðandi at fáa sett nakað av fólki afturat. Her verður eisini tikin hædd fyri, at tvey av starvsfólkunum verða flutt fram til 15. lønarflokk. Sí bræv frá Starvsmannafelagnum 13. september 1984.

Ad konto 213408 Umvælingar
Í sambandi við flyting innanhýsis eru nakrar broytingar av sjálvum hølunum neyðugar, t.d. víðkan av lesistovuni v.m.

ad konto 233050 Innbúgv
Savnið hevur játtan til mynda/lesitól yvir tvey fíggjarár. Hetta er annað játtanarár.

Tólið verður keypt ca. 1. mars 1985.

Enn má nakað av hillum keypast til útgoymsluna í Rættará.

ad konto 000000 Kopitól, kopiering
Ein stór uppgáva hjá savninum er at lata viðskiftafólki og almennum stovnum kopi av bókum og skjølum.

Ætlanin er í framtíðini at leiga kopitól.

ad konto 000000 Útreiðslur í sambandi við flyting
Sum landsstýrinum kunnigt verður umsiting savnsins nú flutt upp á loftið í Starvsstovuhúsunum. Í hesum sambandi má nakað av innbúgvi keypast.

Henda útreiðsla verður bert eina ferð.

Grunnur
Víst verður til tey mongu skriv savnsins um plássviðurskifti. Skotið verður tí upp at játta í byggigrunn kr. 500.000,-.

Viðmerking landsstýrisins:
Ikki tikið við í uppskoti landsstýrisins:
1 skjalavørð kr. 166.000,-

AdAd § 15 - 15403 Føroya Fornminnissavn
Sbrt. skriv dagfest 4. oktober 1984:

Kt. nr.		Roknskapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
103048	Løn/tænastumenn	91.647,02	94.5	100.5	100.5	100.5	100.5
103143	Løn/starvsfólk	707.814,13	845.7	1.308.7	945.5	945.5	945.5
103168	Løn/sáttmálalønt	814.040,03	895.8	927.2	927.2	927.2	927.2
103222	Løn/reingerð	60.689.10	92.0	155.2	155.2	155.2	155.2
103288	Løn/onnur	512.743,94	570.7	1.065.5	1.065.5	1.065.5	1.065.5
113202	Ferða- og dagp. innanl. ...	66.238,55	118.5	126.8	126.8	126.8	126.8
203905	Ymisk kommunikatión	29.652,35	33.0	35.3	35.3	35.3	35.3
213105	El, hiti og vask	47.550,89	44.3	108.8	108.8	108.8	108.8
213408	Umvælingar v.m.	151.932,07	41.7	44.6	44.6	44.6	44.6
213702	Ognartrygging	10.689,25	23.7	25.4	25.4	25.4	25.4
213806	Leiguútreiðslur	66.435,72	75.2	80.5	80.5	80.5	80.5
233051	Innbúgv	64.835,75	70.7	350.0	350.0	125.7	75.7
233259	Postgjald	8.030,50	8.8	10.0	10.0	10.0	10.0
233354	Telefon og telex	17.447,00	31.0	52.4	52.4	46.4	46.4
233409	Leiga av maskinum	0,00	0.0	34.0	34.0	34.0	34.0
233561	Aðrar skrivstovuútr.	29.888,63	30.5	32.7	32.7	32.7	32.7
253085	Bókakeyp og innb.	11.716,19	18.5	23.1	23.1	23.1	23.1

253115	Útgrevstur	48.300,20	29.8	60.0	60.0	60.0	60.0
253268	Umsiting av fornminnum .	153.014,68	167.5	179.2	179.2	179.2	179.2
253306	Amboð	19.655,30	20.9	47.4	47.4	22.4	22.4
253314	Aðrar umsitingarútr.	108.039,40	105.0	284.4	284.4	184.4	184.4
253322	Etnologiskar kanningar ...	19.182,71	20.9	227.4	0.0	0.0	0.0
253903	Aðrar útreiðslur	57.118,55	80.0	80.0	80.0	30.0	30.0
253929	Tænastufør, rakstur	0,00	0.0	20.0	20.0	20.0	20.0
		3.096.661,96	3.418.7	5.379.1	4.788.5	4.383.2	4.332.2

15406 Føroya Fornminnissavn 1985/86

kt.nr.	deild 1	2.1	2.2	3.1	3.2	3.3	4	5	6.1	6.2	6.3	7.1	7.2	8.1	8.2	15406
103048														100.5		100.5
103143	434.8	160.5					165.9	147.7	164.3			235.5				1.308.7
103168	283.1			221.0					166.8			256.3				927.2
103222	65.6				12.9		50.0							26.7		155.2
103288	84.5		68.9		12.3	30.3	26.7	0	62.0	157.4	501.8	34.7	0	63.3	23.6	1.065.5
113202		16.5		15.0					27.8	18.8	18.8	22.4		7.5		126.8
203905														35.3		35.3
213105	42.3				18.5		40.0							8.0		108.8
213408	44.6															44.6
213702	25.4															25.4
213806							80.5									80.5
233051	100.0						200.0	50.0								350.0
233259	10.0															10.0
233354	52.4															52.4
233409	34.0															34.0
233561	32.7															32.7
253085	4.6	3.1		3,1			1.6		3.1			6.0		1.6		23.1
253115									20.0	20.0	20.0					60.0
253268				52.1	127.1											179.2

253306		22.4							25.0							47.4
253314					182.4		80.0	22.0								284.4
253322												27.4	200.0			227.4
253903	60.0	10.0										10.0				80.0
253929	20.0															20.0
	1.294.0	212.5	68.9	291.2	353.2	30.3	644.7	219.7	469.0	196.2	540.6	592.3	200.0	242.9	23.6	5.379.1

1. Fyrisiting

2.1. Fornminnaumsjón, deildin

2. — , skráseting

3.1. Bygningaumsjón, deildin, eftirlit

2. — , Dúvugarðar

3. — , Skansin

4. Gripasavn

5. Myndasavn

6.1. Fornfrøðilig deild, deildin

2. — , rannsókn 1, Eiði ella Klaksvík

3. — , rannsókn 2, Leirvík

7.1. Fólkalívsdeild, deildin

2. — , rannsókn

8.1. Upplýsingadeild, deildin

2. — , serframsýning

kt. 103288, løn onnur

		Játtan 84/85	Umsókn 85/86
1. Fyrisiting	frítíðargjald	45.0	50.0
	at ráða yvir	22.3	34.5
2.1 Fornminnaumsjón	røkt	6.0	6.5
2.2 —	skráseting	0.0	62.4
3.2 Dúvugarðar	røkt	11.5	12.3
3.3 Skansin	røkt	28.3	30.3
4. Konservering	arbeiðshjálp	24.9	26.7
5. Foto	sí kt. 103143	30.0*	0.0
6.1 Fornfrøði	ymisk arbeiði	20.7	21.0
	Miðvágur, liðugtgerð	142.8	41.0
	Kaldbak, —	87.7	0.0
6.2 Eiði el. Klaksvík	rannsókn	0.0	157.4
6.3 Leirvík	leiðsla	0.0	82.1
	arbeiðshjálp	0.0	419.7
7.1 Fólkalívsdeild	skráseting	20.1	34.7
7.2 Klædnarannsókn	sí kt. 103143	51.7*	0.0
8.1 Upplýsing	vaktarhald	62.7	63.3
8.2 —	serframsýning	22.0	23.6
		575.7	1.065.5

Býtið millum arbeiðsøkini kann verða ávirkað av seinni broytingum í arbeiðsætlanini.

*) er flutt til kt. 103143, løn starvsfólk.

Viðmerkingar:
Umframt at byggja fíggjarlógaruppskotið á játtanina í verandi fíggjarári

við regulering smb. vøksturin í prís- og lønargrundarlagnum, fær savnið í komandi fíggjarári rættiliga stórar eykaútreiðslur, sum partvíst standast av, at flutt verður til Hoyvíkar, og nýggjar gripagoymslur, konserverings- og fotohøli verða innrættað har, og partvís av, at savnið má bera kostnaðin av liðugtgerð av fornfrøðiligu rannsóknini á Toftanesi í Leirvík, sum higartil hevur verið partur av tunnils- og vegaarbeiðinum á staðnum.

Uppskotið er sundurgreinað á deildir/arbeiðsøki í skjali I.

ad kt. 103048, 103143 og 103168: sí skjal II

Uppskotið fevnir um nýjáttanir til

1. Umsjónarmann í Hoyvík
2. 1/2 teknikara
3. fotograf

ad 1 Við yvirtøkuni av Hoyvík hevur Fornminnissavnið fingið ábyrgdina av bygningunum og stóru almenu økjunum har. Hesi krevja dagliga røkt, og er tað tí neyðugt, at eitt fólk burturav tekur sær av hesum.

ad 2 Seinastu árini hevur savnið av 103288, løn onnur, lønt einum hálvum fólki at taka sær av klædna- og tekstilsavninum. Hópurin av nýinnsavnaðum klædnagripum er í hesum árum komin til savnið, og túsundtal er skrásett og avfotograferað kring landið. Klædna- og tekstilsavnið er við at koma væl uppundan, men enn er langt á mál. Áhugin er bæði í Føroyum og uttanlands so stórur sum ongatíð, og tað er tí sera umráðandi, at hildið verður áfram við hesum arbeiði. Tað fólk, sum hevur røkt hetta arbeiðið fyri tímaløn, er vorðið alsamt kønari innan økið, og verður tað ein stórur missur, um savnið ikki fær fulla nyttu av teimum fløgum, sum eru gjørdar. Søkt verður tí um, at hetta fólk kemur í fast hálvt starv sum teknikari. Tað verður gjørt vart við, at lønarupphæddin í uppskotinum ikki er tikin við á kt. 103288.

ad 3 Myndasavn savnsins er tey seinastu árini ikki bert økt munandi, men eisini vorðið meiri atkomuligt hjá fólki. Hetta hevur ført við sær, at ein savnshjálpari má nýta stívliga helvtina av arbeiðstíð síni til at fara um myndasavnið og til at hjálpa fólki at leita fram myndir. Áhugin fyri gomlum myndum er alsamt í øking, bæði millum fólk og í bókmenta- og vísundaligum sambandi. Tað arbeiðið, sum lagt verður í myndasavnið, verður tó stórliga tarnað av, at forografur ikki er fast knýttur at savninum, tí ov trupult er at fáa gjørt tað neyðuga myrkakamararbeiðið. Í verandi fíggjarári vórðu játtaðar kr. 30.000,- til fotografering undir kt. 103288. Hetta var ein hjálp, men kann bert løna fotografi fáar tímar um vikuna, og ger hetta, at ikki hevur verið gjørligt at fáa nóg kvalificerað fólk, sum er sinnað at røkja bæði myrkakamararbeiðið og savnið við gomlum plátum og negativum við tí hugi og innliti, sum hetta stóra virðismikla gamla savn hevur uppiborið — fleiri myndir eru, sum eru tiknar beint eftir, at fotografering varð uppfunnin í 1852.

Søkt verður tí um játtan til fotograf. Gjørt verður vart við, at játtaða upphæddin kr. 30.000,- ikki er tikin við á kt. 103288.

ad kt. 103222:

1. Savnshúsini:			
780 t. á kr. 59,64	kr. 46.519,20		
70 t. á kr. 80,51	— 5.635,70	kr. 52.154,90	
2. Goymsla, konservering v.m.		— 50.000,00	
3. Dúvugarðar:			
162 t. á kr. 59,64	kr. 9.661,68		
40 t. á kr. 80,51	— 3.222,40	— 12.882,08	
4. Bókasavnsloftið:			
380 t. á kr. 59,64	kr. 22.663,20		
50 t. á kr. 80,51	— 4.025,50	— 26.688,70	
Frítíðarløn 9,5% av 141.725,68		— 13.463,93	
		kr. 155.189,61	

ad 1 Roknað verður við somu útreiðslum sum í verandi starvshúsum.

ad 2 Reingerð í hølum til goymslu, konservering, skráseting v.m. kann ikki neyvt setast, men verður mett til uml. kr. 50.000,-.

ad 3 Vøksturin stendst av reingerð í toiletbygningi.

ad. kt. 103288: sí skjal III.

ad. kt. 213105:

Starvshúsini:		
EL:	kr. 15.000,-	
hiti:	— 24.000,-	
vask:	— 3.300,-	kr. 42.300,-
Goymsla, konservering v.m. .		— 40.000,-
Bókasavnsloftið		— 8.000,-
Dúvugarðar		— 18.500,-
		kr. 108.800,-

ad.kt. 233051: Innbúgv

1.	Nýkeyp og renovering av skrivstovuinnbúgvi	kr. 40.0
	Tekstviðgerðartól til viðgerð av: Frásagnarsavni, fornminnaskrá, gomlum húsalýsingum, gripaskrá, myndaskrá, umframt til vanligt skrivstovubrúk	— 60.0
4.	Konserveringslab. útgerð	— 200.0
5.	Fotolab. útgerð	— 50.0
		kr. 350.0

ad. kt. 233259: Postgjald
Roknað er við 12% hækkan samb. posttakstir pr. 1. okt. 1984.

ad. kt. 253354: Telefon og telex
Við flytan til Hoyvíkar verður neyðugt við nýggjum vekslara (Polygon 10)

Stovningargjald	kr. 6.0	
Ársgjald	— 13.2	
Telefonnýtsla	— 33.2	kr. 52.4

ad. kt. 233409:

Leiga av maskinum ..... kr. 34.0

Nýggj konto. Tá flutt verður til Hoyvíkar, er ikki gjørligt sum higartil at nýta kopimaskinur v.m. hjá "Stovnunum á Debesartrøð".

ad. kt. 253115: Útgrevstur
Við tí vaksandi útgrevstrarvirkseminum hevur tað víst seg hesi seinnu árini, at játtanin hevur verið alt ov tepur.

ad. kt. 253306: Amboð
Royndir okkara við fototorni í sambandi við fornfrøðiligar rannsóknir vísa, at tað ber til at spara nógv flatatekningararbeiði við avmyndan úr erva. Tó standast trupulleikar av at samskipa nýtsluna av torninum millum grevstrarnar. Søkt verður tí um játtan, kr. 25.000,-, til eitt torn afturat, so tey kunnu standa fast, hvørt á sínum grevstri.

Ad. kt. 253314: Aðrar umsitingarútreiðslur

3.3	Skansin:	
	røkt, vaktarhald v.m.	kr. 82.4
	ábøtur á stongina	— 100.0
.4	Konserverings- og pakkitilfar	— 40.0
	Konservering uttanlands	— 40.0
5.	Filmir, fotopappír, kemikaliir v.m.	— 22.0
		— 284.4

Ad. kt. 253322: Etnologiskar kanningar

7.1	Ymsar útreiðslur	27.4
7.2	Rannsókn: »Føroyski báturin«	200.0
		227,4

Víst verður til F.L.j.nr. 2203-8.

Allar royndir at fíggja hesa uppgávu at dokumentera sniðið í gamla føroyska bátinum, so hann m.a. kann verða mynsturvardur, við játtanum frá grunnum, peninga- og øðrum stovnum hava verið til fánýtis. Hóast projektið í hvussu so er partvíst má metast sum eitt neyðugt ídnaðartiltak til vernd av framleiðsluni av føroyskum bátum, hava flest allar umsóknir verið avvístar, vísandi til, at tað snýr seg um vísindaliga rannsókn, sum almennur stovnur stendur fyri, og tí hoyrir heima á løgtingsfíggjarlógini. Savnið søkir tískil um kr. 200.000,-, so farast kann í gongd við hetta átroðkandi arbeiðið.

ad. kt. 253903: Aðrar útreiðslur

Hædd er tikin fyri óvæntaðum útreiðslum í samb. við flyting til Hoyvíkar.

Viðmerkingar landsstýrisins:
Ikki tikið við í uppskoti landsstýrisins:

1 umsjónarmann í Hoyvík	kr. 140.500,-
½ teknikara	kr. 75.000,-
1 fotograf	kr. 147.700,-
etnologiskar kanningar	kr. 200.000,-

Ad § 15 — 15508 Bygdasøvn v.m.
Sbrt. skriv dagfest 8. oktober 1984:

15508 Bygdasøvn v.m.

Kt.nr.		Roknskapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
103509	Samsýningar	8.000	15.0	16.0	16.0	16.0	16.0
323293	Í grunn til gl. prestah. á Nesi ...	0.0	100.0	50.0	50.0	50.0	50.0
373106	Rakstrartilskot	109.257	190.0	480.0	480.0	480.0	480.0
373504	Fornminnisnevnd	—	20.0	20.0	20.0	20.0	20.0
373905	Umvælingarstudn. í grunn	99.090	110.0	120.0	120.0	120.0	120.0
		216.347	435.0	686.0	686.0	686.0	686.0

ad.kt.nr. 373106: Rakstrattilskot

Lógarbundni studningurin til góðkend bygdasøvn verður væntandi:

Miðvágs Bygdasavn	12.0	16.0
Norðoya Fornminnissavn	177.6	267.0
Vestmanna Bygdarsavn	—	16.0
Skopunar Bygdarsavn	—	56.0
Eiðis Bygdarsavn	—	105.0
Nýstovnan av bygdasøvnum	—	20.0
	189.6	480.0

Viðmerkt skal verða, at játtanin 1984/85 er ov tepur, partvíst vegna størri virksemi enn mett á Norðoya Fornminnissavni og partvís vegna stovnan av Vestmanna Bygdarsavni.

Ad § 15 — 155551 Fiskirannsóknarstovan
Sbrt. skriv dagfest 2. oktober 1984:

Rakstrarstað		Roknskapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
73057	Endurgjald ríkið	÷580	÷964	÷1.076	÷1.076	÷1.076	÷1.076
103143	Løn starvsfólk	135	469	510	510	510	510
103168	Løn sáttmálalønt	1.960	1.934	2.400	2.200	2.200	2.200
103288	Løn onnur	3	45	45	45	45	45
113202	Ferða- og dagpeningur .	13	75	75	75	75	75
213806	Leiguútreiðslur	83	82	120	120	120	120
233051	Innbúgv	15	30	40	40	40	40
233155	Prentlutir	23	25	30	30	30	30
233259	Postgjøld	7	10	10	10	10	10
233354	Telefon	41	50	60	60	60	60
233561	Aðrar skrivstovuútreiðsl.	7	30	35	35	35	35
253306	Amboð	690	175	185	185	185	185
253339	Leiga av førum o.a. ...	137	300	300	300	300	300
253363	m/s Magnus Heinason .	5.895	8.075	9.285	9.285	9.285	9.285
253903	Aðrar útreiðslur	46	25	40	40	40	40
		8.475	10.361	12.059	11.859	11.859	11.859

Viðmerkingar:

Konto 103168 Løn sáttmálalønt
Søkt verður um ein fiskifrøðing afturat. Vit eru ov illa mannaðir til tær uppgávur, ið eru settar okkum. Ein fiskifrøðingur (avloysari fyri

Kjartan Hoydal) hevur arbeitt hjá okkum góð 2 ár. Kjartan kemur aftur í starv um nakrar mánaðir, men vit skjóta upp, at avloysarin eisini verður settur í fast starv.

Konto 213806 Leiguútreiðslur
Hækkingin stavar frá, at vit fyribils koma at leiga nøkur høli á loftinum afturat.

Konto 253363 m/s Magnus Heinason
Víst verður til hjáløgdu kostnaðarætlan.

A fundi við landsstýrið tann 6. august 1984 var semja um, at landsstýrið sum skjótast skuldi taka prinsippavgerð um bygging av húsum til Fiskirannsóknarstovu og Vaktar- og Bjargingartænastu við fyriliggjandi arkitektuppskoti sum grundarlag.

Rakstrarætlan m/t Magnus Heinason 1985/86

Hýrur	4.600	
Olja, íroknað studning	3.500	
Trygging	650	
Vanlukkutrygging	50	
Reiðskapur	1.200	
Útgerð	450	
Proviantur	320	
Havnagjøld	35	
Viðlíkahald	2.000	
Ymist	100	12.905
Inntøkur:		
Avreiðing av fiski	1.700	
Avreiðing royndarfisking	1.000	
Avreiðing rannsóknir	250	
Rakstrarstudningur	670	3.620
		9.285

Viðmerkingar landsstýrisins:
1 nýtt starv til 1 fiskifrøðing kr. 200.000 ikki tikið við í uppskoti landsstýrisins.

Ad § 15 — 15703 Føroya Náttúrugripasavn
Sbrt. skriv dagfest 28. september 1984:

Uppskot til fíggjarætlan 1985/86, 1986/87 og 1987/88
fyri Føroya Náttúrugripasavn, RK 15703

1.000 kr.		Roknskapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
103143	Løn - starvsfólk	350*	405	565	565	565	565
103168	Løn - sáttmálalønt	295*	260	280	280	280	280
103222	Løn - reingerð	71	82	90	90	90	90
103288	Løn - onnur	192	220	170	170	170	170
113202	Ferða- og dagp. innanl.	9	12	15	15	15	15
113243	Ferða- og dagp. uttanl.	34	0	0	0	0	0
203308	Lýsingar	2	2	3	3	3	3
213105	El, hiti og vask	126	125	140	140	140	140
213503	Umsiting	243	475	190	190	100	100
213702	Ognartrygging	11	11	13	13	13	13
213806	Leiguútreiðslur	18	19	19	19	19	19
233051	Innbúgv	14	15	16	16	16	16
233155	Prentlutir	5	8	12	12	12	12
233259	Postgjald	5	6	10	10	10	10
233354	Telefon og telex	36	22	26	26	26	26
233561	Aðrar skrivstovuútr. ...	6	6	8	8	8	8
253085	Bókakeyp og -innbinding	5	9	11	11	11	11
253306	Amboð	20	25	30	30	30	30
253396	Kanningar- og savnarb.	65	85	90	90	90	90
253903	Aðrar útreiðslur	2	2	2	2	2	2
		1.509	1.789	1.690	1.690	1.600	1.600

* *Skeivt bókað* konto 103143 Løn starvsfólk skal vera kr. 32.518,68 meira og konto 103168 Løn sáttmálalønt skal vera kr. 32.518,68 minni.

Viðmerkingar til fíggjarløgtingslóg 1985/86
Føroya Náttúrugripasavn. Rakstrarstaður 15703

Løn starvsfólk

Jóannes Rasmussen, sum sambært avtalu við landsstýrið virkar sum ráðgevi landsins í jarðfrøðiligum spurningum, hevur síðan 1. okt. 1980 fingið eina samsýning upp á kr. 3.000 um mánaðin. Av tí at Jóannes Rasmussen framvegis er einasti jarðfrøðingur, ið kann vegleiða landsstýrið, byggifeløg og t.d. SEV, og av tí at upphæddin kr. 3.000 um mánaðin ikki er hækkað síðan 1980, skjóta vit upp, at hann frá 1. apríl 1985 fær kr. 5.000 um mánaðin.

1. okt. 1983 settu vit Marionnu Debes Dahl í starv sum leys meðhjálp fyri tímaløn. Vit søkja nú um at fáa hana flutta til konto løn starvsfólk við hálvari løn. Upphæddin kr. 72.000 um árið verður at minka tilsvarandi á konto løn onnur.

Ferða- og dagpeningur innanlands

Vit hava higartil spart nógvan pening á konto ferðir innanlands við tað, at vit kunnu læna DGU bilin. Næsta ár verða ætlandi 2 DGU menn fast í Føroyum, og kunnu vit tá ikki vænta at kunna nýta henda bilin so nógv. Vit verða tá at fáa munandi større útreiðslur til ferðing innanoyggja.

Umsiting

Ein koyrivegur má gerast til Gamla Bókasavnsbygningin serliga av tí, at brandbilar skulu kunna koma framat, men eisini tí, at vit sjálvi hava brúk fyri, at lastbilar kunnu koyra til húsini. Vegurin frá J.C. Svabosgøtu niðan til húsini tolir ikki tunga ferðslu. Landsverkfrøðingurin hevur mett prísin at verða 90.000 kr.

Prentlutir
Vit ætla at prenta upplýsandi tilfar um framsýningarnar.

Postgjald
Postgjaldið fer upp, og vit hava undirskot á hesi konto, har ikki ber til at spara nógv, um stovnurin skal vera virkin.

Ad § 15 — 15717: D.G.U. (Danmarks Geologiske Undersøgelse) Føroya Deild

Sbrt. skriv dagfest 20. oktober 1984:

Kontonummar og navn		Rokn-skapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot lands-stýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
103058	Endurgjald til ríkið ...		225.000	245.000	245.000	245.000	245.000
253459	Útreiðslur viðv. arkiv-ering og goymslu (Jarðfrøðisavnið)		60.000	60.000	60.000	60.000	60.000
213806	Húsaleiga: endurgjald til Náttúrugripasavnið .		70.000	70.000	70.000	70.000	70.000
253309	Kanningararbeiði (sbr. DGU)		75.000	75.000	75.000	75.000	75.000
			430.000	450.000	450.000	450.000	450.000

Uppskot til fíggjarætlan fyri 1985/86 fyri Fróðskaparsetur Føroya — rakstrarstað 15755 á fíggjarløgtingslógini

Hjálagt verður sent landsstýrinum 2 eintøk av fíggjarætlanaruppskoti fyri stovnin, soleiðis sum setursráðið hevur góðkent tað á fundi 31. oktober 1984.

Uppskotið er skipað so:

a) Útfylt oyðubløð frá landsstýrinum — skjal I og II
b) Viðmerkingar til uppskotið 1985/86 (1-21, 5 bls.)
c) Býtið av upphæddunum í uppskotinum 1984/85 á Setursskrivstovu, Gudfrøðideild, Føroyamálsdeild og Støðisútbúgving (1 bls.)

Í mun til játtan 1984/85 hækkar samlaða uppskotið 1985/86, allar umsóknir íroknaðar, við 19,8%.

Meginorsøkin til hækking upp um sáttmálaásettar útreiðslur og prísvøkstur er samtykt setursráðsins um — sum eina roynd — at seta á stovn í lestrarárinum 1985/86 høvuðsgreinarnám í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum (sbrt. framlagda uppskoti til námsætlan). Í tí sambandinum verða 2 nýggj tíðaravmarkað lærarastørv at skipa við Føroyamálsdeildina. Deildin hevur skotið upp, at bæði størvini verða á professarastigi; setursráðið hevur samtykt at mæla til, at annað av størvunum verður á professarastigi (umbiðin grundgeving frá deildini fyri stovnsetan av professarastarvi er hjáløgd hesum skrivi).

Samanumtikið kann sigast, at við uppskotinum 1985/86 er lagt upp til vøkstur innan bæði endamál setursins: Vísindaligt rannsóknarstarv og hægri undirvísing.

Fíggjarætlanarmetingar fyri 1986/87 og 1987/88 eru settar á skjal I.

Stovnsetan av einum professarastarvi í sambandi við høvuðsgreinarlestur

Sum kunnugt hevur deildin í sambandi við uppskot sítt til nýggja fíggjarætlan søkt um 2 professarastørv, ávikavist í máli og bókmentum, knýtt at komandi høvuðsgreinarlestri. Á avgreiðslufundi 22. í hesum, har málið varð viðgjørt, varð álagt deildini at tilevna eina grundgeving fyri stovnsetan av *einum* professarastarvi.

Grundgeving okkara er:

1. Í námsætlanini fyri høvuðsgreinini er sagt, at greinin verður í støddd og dýpd miðað eftir samsvarandi akademiskum lestri í móðurmálinum til skúlaembætisprógv við lærdar háskúlar í

Norðurlondum. Hetta merkir, at krøvini til undirvísingarførleika í oddastørvunum í máli og bókmentum hækka upp á professarastig, um vit ynskja, at høvuðsgreinarprógv okkara skal kunna góðkennast — eins og áður árs- og exam.art. prógv okkara — sum samsvarandi partur í sambinding við akademiskan lestur uttanlendis. Vit meta tí, at *eitt* professarastarv á deildini er minsta mát at tryggja høvuðsgrein okkara slíka góðkenning.

2. Exam.art. næmingar, ið hava sagt seg hugaðar at lesa høvuðsgrein okkara, hava gjøgnum deildarumboð sítt gjørt vart við, at undirvísingin má vera samsvarandi við høvuðsgreinarlestur í øðrum londum (Sí *Skøruna* Nr. 3/1984). Vit meta tí eitt professarastarv sum eina fortreyt hjá studentunum til undirvísingina og harvið eisini námsluttøku teirra.

3. Í hægra skúla okkara, har høvuðsgreinin í føroyskum skal nýtast og er ætlað at virka javnbjóðis við undirvísingina har í donskum, ið sum kunnugt eisini byggir á høvuðsgreinarprógv (úr Danmark), meta vit tað vera neyðugt fyri umdømið hjá høvuðsgrein okkara, at eitt professarastarv verður knýtt at undirvísing okkara frá byrjan av.

Kontonummar og navn	Roknskapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
* 83904 Ymiskar inntøkur	÷30.0	÷25.0	÷30.0	÷30.0	÷30.0	÷30.0
* 103127 Løn/lærarar	408,6	536,0	675,0	675,0	675,0	675,0
* 103143 Løn/starvsfólk	1.151,1	1.317,0	1.460,0	1.392,0	1.392,0	1.392,0
* 103168 Løn/sáttmálaløn	2.110,3	2.444,0	2.753,0	2.253,0	3.033,0	3.033,0
* 103288 Løn/onnur	69,5	92,0	100,0	100,0	100,0	100,0
* 103509 Samsýningar	68,2	76,0	124,0	124,0	124,0	124,0
* 133202 Ferða- og dagpening. (innl.)	18,0	35,0	42,0	42,0	42,0	42,0
* 113243 Ferða- og dagpening. (útl.)	64,7	70,0	135,0	135,0	135,0	135,0
* 123103 Skeið	12,4	15,0	26,0	26,0	26,0	26,0
113053 Fólkatryggingar	6,1	7,0	9,0	9,0	9,0	9,0
* 203308 Lýsingar	21,3	20,0	30,0	30,0	30,0	30,0
* 203403 Dagbløð, tíðarrit	15,2	20,0	25,0	25,0	25,0	25,0
213408 Umvælingar	18,1	15,0	18,0	18,0	18,0	18,0
* 213503 Umsitingar	75,3	80,0	130,0	130,0	130,0	130,0
* 213806 Leiguútreiðslur	107,4	136,0	150,0	150,0	150,0	150,0
* 233051 Innbúgv	75,3	51,0	85,0	85,0	85,0	85,0
* 233155 Prentlutir	23,9	34,0	60,0	60,0	60,0	60,0
233259 Postgjald	25,6	29,0	36,0	36,0	36,0	36,0
233354 Telefon og telex	78,0	65,0	72,0	72,0	72,0	72,0
* 233545 Serjáttan til dátutól	199,9	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
* 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur	45,5	42,0	50,0	50,0	50,0	50,0
* 253085 Bókakeyp og innbinding ..	77,9	66,0	90,0	90,0	90,0	90,0
* 253306 Amboð	112,8	52,0	135,0	135,0	135,0	135,0
* 253314 Aðrar umsitingarútreiðslur	70,9	85,0	110,0	110,0	110,0	110,0
* 253903 Aðrar útreiðslur	70,6	76,0	110,0	110,0	110,0	110,0
Fróðskaparsetrið tilsamans	4.896.6	5.338.0	5.395.0	5.857.0	5.877.0	5.857.0
Tils.: Ymiskar inntøkur	÷30.0	÷25.0	÷30.0	÷30.0	÷30.0	÷30.0
Lønir og samsýningar	3.807.7	4.465.0	5.112.0			
Allar aðrar útreiðslur	1.118.9	898.0	1.313.0	5.827.0	5.827.0	5.827.0

* = Viðmerkingar á hjálagda skjali (5 bls.).

Viðmerkingar til uppskot til fíggjarætlan 1985/86

1) **Ymiskar inntøkur:** Tilmeldingargjald til almenn kvøldskeið, mett til 30.0

2) **Løn/lærarar:** Undirvísingarhjálp frá leysa- og gestalærarum

a) *Læraraskeið setursins*

Lestrarárið 84-85 at enda (apr.-juni 85)	38.0	
Ætlan fyri lestrarárið 85/86 (aug. mars):		
Fult ársskeið í Tórshavn (høvuðsgreinir: søga og siðsøga — 17 t/v)	117.0	
2 støk skeið í Tórshavn (a 3 t/v)	42.0	
4 styttri skeið á bygd (a 20 t.)	23.0	
Skeiðsleiðsla (serviðbót fyri fakliga ábyrgd og leiðslu)	25.0	245.0

Undirvísingartímar 85/86, tils. (allir tímar leysalæraratímar) ..... 770 t.

Til samanberingar:

Játtan 84/85 røkkur til leysalærara-hjálp í ..... 625 t.

Lestrarárið 84/85 er tilætlaða skeiðs-tímatalið um ..... 800 t.

b) **Almenn kvøldskeið**

Ætlan fyri lestrarárið 85/86, 4-5 skeið, 10-12 flokkar, høvuðsdentur at leggja á prógvskeið í málum (20 v. á 25 t.)	95.0	
2 styttri skeið (á 25 t.)	10.0	
Støðu- og fráfaringarroyndir	15.0	120.0

Undirvísingartímar 85/86, tils. ..... 550 t.

Til samanberingar:

Játtan 84/85 røkkur til ..... 525 t.

c) **Gudfrøðideildin**

Exam.art.-nám í kristni/religión, apr.-juni 85	25.0	
Til tess at fullfíggja námið verður neyðugt hjá næmingunum at fara á annan lærdan háskúla at taka eina lærugrein. At geva teimum høvi at byrja lesturin á deildini er uppskot um gestalæraravitjan á vári 85 (2 vikur)	10.0	
Ætlan fyri lestrarárið 85-86 (sept.-mars): Skeið í kristni fyri leikfólk, í Tórshavn og á bygd (120 leysalæraratímar)	35.0	70.0
Uppskot 85/86 svarar til 245 leysalæraratímar		
Til samanberingar:		
Játtan 84/85 røkkur til 270 leysalæraratímar		

d) **Føroyamálsdeildin**

Lestrarárið 1985-86 (sept.-mars):

Ársnám (1. árs lestur) byrjar aftur sept. 85.

Høvuðsgreinarnám verður sett á stovn, treytað av neyðugari játtan, fyrst og fremst til 2 nýggj tíðaravmarkað lærarastørv frá 1.10.85 (sí løn/sáttmálalønt).

Føroyamálsdeildin (framhald)

Til serstøk evni verður tørvurin á leysalærara-hjálp mettur til 50 undirvísingartímar	15.0	
Haraftrat er uppskot um gestalærarahjálp í 1 viku	5.0	20.0
Uppskot 85/86 svarar til 70 leysalæraratímar		
Til samanberingar:		
Játtan 84/85 røkkur til 165 leysalæraratímar		

e) **Støðisútbúgvingin**

Lestrarárið 85-86 verður aftur upptøka av

nýggjum næmingum, treytað av neyðugari játtan, fyrst og fremst til leysalærarahjálp.
Við fullari vikuskrá fyri *2 næmingalið* — 2 lestrargreinir við kravdum skeiðum og valskeiðum — verður tørvurin á leysalærarahjálp fíggjarárið mettur til 460 fyrilestratímar (1. lønarstig) og 425 venjingartímar (2. lønarstig) 220.0

Umroknað til 1. lønarstig svarar uppskot 85/86 til ..... 770 leysalæraratímar

Til samanberingar:
Játtan 84/85 røkkur til 500 leysalæraratímar (1. lønarstig).

Løn/lærarar, tils. 675.0

Undirvísingarløn til leysalærarar:
Pr. 1.7.84 er grundlønin 101.43. Aftrat verða at leggja 3 dýrtíðarviðbøtur og frítíðarpeningur.

Roknað verður við 2 lønarstigum: 1. + 90 min. fyrireiking
2. + 40 — —

3) **Løn/starvsfólk**

Setursskrivstovan:	sbrt. starvsskipan 84/85:	3¾ størv (4 starvsfólk)	=	651.0
	+ *Umsókn* 85/86:	¼ starv (sí niðanfyri a)	=	45.0
Føroyamálsdeild:	sbrt. starvsskipan 84/85:	3 størv (4 starvsfólk)	=	460.0
	+ *Umsókn*	84/85: ½ starv (sí niðanfyri b)	=	68.0
Støðisútbúgving:	sbrt. starvsskipan 85/86:	1½ starv (2 starvsfólk)	=	236.0
Starvsfólk, tils.		9 størv (10 starvsfólk)	=	1.460.0

Tølini eru sett upp eftir sáttmálaløn pr. 1.7.84, hartil 3 dýrtíðarviðbøtur.

a) Vegna vøkstur í ráðleggingaruppgávum á setursskrivstovuni verður søkt um, at yvirassistentstarvið verður skipað sum heilt starv.

b) Til at menna orðasavnsarbeiðið verður søkt um, at hálvt assistentstarv verður skipað sum heilt starv.

Viðv. starvsfólkum kann verða víst til fylgiskjal II.

4) **Løn/sáttmálaløn**

Setursskrivstovan: 1 granskingarstyrkur (kandidatstipendium, skipað í 83/84)		173.0
Gudfrøðideild: 1 deildarleiðari/lektari (galdandi starvsskipan)		278.0
Løn sáttmálaløn (framhald)		
Føroyamálsdeild: 2 lektarar		
2 adjunktar		
(galdandi starvsskipan)	1.006.0	
+ Umsókn (sí viðm. niðanfyri)		
2 størv frá 1.10.85	280.0	1.286.0
Støðisútbúgving: 3 lektarar		
1 adjunktur		
(galdandi starvsskipan)		1.016.0
Sáttmálaløn, tils. 11 lærarar + 1 granskingarstyrkur		2.753.0

Viðm.: Lønarupphæddirnar eru settar upp eftir tølunum í Magistarasáttmálanum, sum gongur til 1.4.85 (sum er, verða allir lærarar uttan ein løntir eftir hesum sáttmála). Eftir Magistarasáttmálanum stendur galdandi viðbótaupphædd við til 1.10.85. Ein møgulig hækking eftir nevnda dag er *ikki* tikin við í uppskotið.

Viðv. umsóknini um 2 størv frá 1.10.85:
Samtykt er — treytað av neyðugari játtan — at seta høvuðsgreinarnám á stovn í lestrarárinum 1985-86. Til at fremja hesa samtykt er neyðugt at seta 2 lærarastørv aftrat á Føroyamálsdeildini. Annað teirra eigur at vera á professarastigi (sbr. hjálagt skjal frá deildini). Høvuðsgreinarnámið verður í fyrstu atløgu eitt royndarnám, tískil verða bæði størvini at tíðaravmarka. Eyka lønarútreiðslur í fíggjarárinum 85/86 eru mettar til 280.000 kr. fyri 6 mán. Í ætlan 86/87 og 87/88 hækkar hetta tal upp í 560.000 kr.

5) *Løn/onnur*

Setursskrivstovan:	Avloysari	15.0	
Føroyamálsdeild:	Hjálpararbeiði í sambandi við orðasavnið, bandasavnið, handbókasavnið	65.0	
Støðisútbúgving:	Hjálpararbeiði í sambandi við dátuviðgerð	20.0	100.0
Løn/onnur, tils.			100.0

6) **Samsýningar**

Setursskrivstovan:	20 alm. fyrilestrar í Tórshavn og á bygd	24.0	
	Sams. fyri meting av umsóknum (granskingarst., størv)	10.0	
	Fundarpeningur sbrt. uppskoti 83 (avgreiðslu-/ráðsfundir) ..	15.0	
	Uppskot um sams. til ráðsformann	10.0	
	Ymist	5.0	64.0
Gudfrøðideild:	Prógtøkur 85	8.0	
	Ymist	2.0	10.0
Føroyamálsdeild:	Prógtøkur 85	18.0	
	Ymist	2.0	20.0
Støðisútbúgving:	Prógtøkur 85/86		30.0
Samsýningar, tils.			124.0

7) *Ferða- og dagpèningur* (innl.)
Upphæddin fevnir um savningar- og granskingarferðir lærara og næminga, skeið/fyrilestrar á bygd, fyrilestrahaldarar/próvdómarar av bygd.

8) *Ferða- og dagpeningur* (uttanl.)

9) *Skeið*
Studningar til næmingar, sum fara á norðurlendsk summarskeið *og* skeið fyri starvsfólk í nýtslu av nýggjum tólum.

10 *Lýsingar*
Skal Fróðskaparsetrið lýsa í øllum dagbløðum, er neyðugt at hækka lýsingarjáttan munandi.

11) *Dagbløð/tíðarrit*
Hækking upp um prísvøkstur hevur samband við stovnan av høvuðsgreinarnámi.

12) *Umsitingar*
Húsini í J.C. Svabosgøtu 7 (landsogn):
Framhald av ábótum innanhýsis, heruppií málaraarbeiði (80.0), nýtt tak (40.0).

13) *Leiguútreiðslur*
Leigusáttmáli við Málingahandilin fyri undirvísingarhøli til Støðisútbúgvingina (90.0), leiga fyri Føroyamálsdeild (60.0).

14) *Innbúgv*
Útskifting av skrivimaskinum, hillar o.a. neyðugt innbúgv (50.0). Skrivstovuútgerð í samb. við nýggj størv (35.0).

15) *Prentlutir*
Felags útreiðslur (skrivstovutilfar, almenna skráin, Skøran — 30.0), deildarútreiðslur (10.0). *Haraftrat prenting av ársfrá-*

greiðing og/ella upplýsingarblað um Fróðskaparsetrið (á føroyskum og útlendskum máli — 20.0).

16) Serjáttan til dátutól
Viðm. til roknskapartalið 83/84:
Eftir umsókn bar landskassin helvtina av kostnaðinum upp á tils. 400.000 av nýggjum dátutólum á Støðisútbúgvingini. Hina helvtina rindaði ríkiskassin.

17) *Aðrar skrivstovuútreiðslur*
Uppi í upphæddini er umsókn frá Gudfrøðideild um játtan til arbeiðstilfar til sjálvboðið bíbliutýðingararbeiði.

18) Bókakeyp og innbinding
Hækking í mun til játtan 84/85:
Uppafturtøka av umsókn frá Gudfrøðideild um størri játtan til handbøkur (+ 8.0).
Eyka bókakeyp til høvuðsgreinarnámið á Føroyamálsdeild (+ 15.0).

19) *Amboð:* Tólbúnaður

Støðisútbúgving:	Tól til undirvísing og gransking sbrt. lista frá deildini		
	Alisfrøði	20.0	
	Evnafrøði	10.0	
	Dátu-/stødd-/hagfrøði	0.0	30.0
Føroyamálsdeild:	Tól til savningaruppgávur		15.0
Setursskrivstovan:	Teknisk útgerð til fyrisitingar-uppgávur (íroknað ritbúnað) ..		90.0
Amboð, tils.			130.0

Viðm.: Seinnu árini eru álagdar setursskrivstovuni fleiri uppgávur, enn arbeiðsorka er til. Ein loysn á hesum spurningi er at taka nútímans teknisku útgerð í nýtslu. Ætlanin er at nýta tólini til:
1. roknskaparhald (m.a. innanhýsis bókhald fyri sundurbýtta

játtan, roknskap fyri setrið sum sjálveigandi stovn, ymsar grunnar, bókaútgávu Føroya Fróðskaparfelags — felagið er forlag setursins).
2. skráseting (serstakliga í samb. við næmingatilmelding og prógtøkufyrisiting, ið er miðsavnað á setursskrivstovuni; hartil av fyrisitingarmálum og postgreiðslum).
3. tekstviðgerð (til handahóvsarbeiði, sum gongur aftur við jøvnum millumbilum).

20) **Aðrar umsitingarútreiðslur:** Rakstur og viðlíkahald av tólbúnaði

Støðisútbúgving:	Sbrt. uppgerð frá deildini fara til:		
	Alisfrøði	20.0	
	Evnafrøði	30.0	
	Dátu-/stødd-/hagfrøði	50.0	
Setursskrivstovan:	Til nýggja útgerð	10.0	110.0
Aðrar umsitingarútreiðslur, tils.			110.0

21) **Aðrar útreiðslur**

Upphæddin fevnir um:			
Tilfar til savningararbeiðið á Føroyamálsdeild (ljóð-/sjónbond, myndir, kort o.a.)		40.0	
Felags útreiðslur til fundir, borðfæ o.t.		10.0	
At býta millum setursskrivstovu og deildir til smærri útreiðslur		15.0	
Setrinum at ráða yvir til óvæntaðar útreiðslur		20.0	
Annað umfar av arkitektkanning av hølistørvi og gerð av ætlan fyri nýbygging		25.0	110.0
Aðrar útreiðslur, tils.			***110.0***

Býtið av upphæddunum í uppskotinum fyri 1985/86 við umsóknum

SSS: Setursskrivstova (miðfyrisiting, læraraskeið, almenn kvøldskeið, almennir fyrilestrar)

253903/Aðrar útreiðslur	251.430,37	150.000,-	200.000	200.000	200.000	200.000
	7.292.254,44	8.255.000,-	8.955.886	8.955.886	8.955.86	8.955.886

Fíggjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingarskipastuna [illegible]
Rakstrarstað: 16334 »Ólavur Halgi«

Kontonr.	Rokn-skapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot lan.s-styris. 1985/8[illegible]	[illegible]tla. 19 6/87	[illegible]lan 1987/88
83904/Inntøkur	223.000,00	0	0	[illegible]	0	[illegible]
103143/Løn-starvsfólk	3.254.354,42	3.485.000,-	3.809.441	3.809.4[illegible]1	3.[illegible]09.4[illegible]	3.8[illegible]9.441
103151/Løn-avloysarar	154.048,28	130.000,-	200.000	200.000	200.000	200.[illegible]
103405/Úrtíðarløn	15.025,45	20.000,-	30.000	30.000	30.[illegible]	30.000
123103/Skeið	37.432,94	30.000,-	40.000	40.00[illegible]	40.000	40.000
213702/Trygging	256.253,25	250.000,-	260.000	260.000	260.000	260.000
253107/Kostur	263.335,15	350.000,-	350.000	350.000	350.000	350.[illegible]0
253306/Nav. amboð	87.077,00	150.000,-	200.000	200.000	[illegible]0	200.000
253418/Olja	1.956.817,25	2.459.000,-	2.459.000	2.459.000	[illegible].459.[illegible]0	2[illegible]59.000
253426/Deksútgerð	52.233,73	120.000,-	150.000	150.00[illegible]	50.[illegible]0	[illegible]
253434/Maskinútgerð	229.999,30	200.000,-	200.000	200.000	2[illegible]	[illegible]
253442/Skipasm.útreiðslur	434.535,90	500.000,-	600.000	600.000	[illegible]	[illegible]
253903/Aðrar útreiðslur	209.310,35	150.000,-	200.000	200.000	200.[illegible]	200.
	6.727.423,02	7.844.000,-	8.499.441	8.499.[illegible]1	[illegible]	[illegible]

Ad § 16-16403: Laksa- og sílaaling
Sbrt. skriv dagfest 8. oktober 1984:

Kontonr.	Rokn-skapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
Aðrar útreiðslur	1.000	1.000	2.000	2.000	2.000	2.000

Viðmerkingar: Seinastu tvey fíggjarárini hevur játtanin til p/f Fiskaaling verið nýtt til lutvísa bygging av alistøð við Áir. P/f Fiskaaling er nú so væl fyri fíggjarliga, at ikki skuldi verið neyðugt við studningi til ílegging ella rakstur.

Afturímóti er tað eftir okkara hugsan umráðandi, at meira gransking og fleiri royndir verða gjørdar innan havbúnað.

Víst verður til hjálagda skriv til landsstýrið frá p/f Fiskaaling. Vit taka undir við uppskotinum um, at rakstrarstaðið fær navnabroyting til Royndir innan Havbúnað, og at Fiskirannsóknarstovan fær heimild at brúka peningin til gransking og royndir innan havbúna.

Fylgiskjal til:
Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1985/86 viðvíkjandi rakstrarstað 16403, Laksa- og sílaaling
Øll 1970-árini hevur p/f Fiskaaling, sum tá var einasta alistøð í landinum, arbeitt við royndum at ala síl og laks beinleiðis til útflutnings. Stórur dentur hevur samstundis verið lagdur á at bøta um sílaslagið og at finna rætta laksatilfarið at ala í sjógvi undir okkara umstøðum.

Frá 1980 hevur felagið latið eina støðugt vaksandi nøgd av sjóbúnum síli og laksi til aðrar alistøðir í sjógvi, og nú útbygt er við Áir, hava vit verið førir fyri at latið alt meira av rogni og byrjanarfóðraðum yngli til tær nýggju smoltstøðirnar.

P/f Fiskaaling eigur framvegis at hava um hendi at halda við líka og bøta um arvaeginleikarnar í alifiskinum í Føroyum í neyvum samstarvi við royndarstøðir í grannalondum okkara sum higartil. Men nú rættulig

gongd aar út til at vera komin á aling av sili og laksi í Føroyum, eigur felagið at fáa figgjarligan møguleika eisini at gera meira við aðrar royndir innan havbúnað:

1) Havbit:

At senda laks út á hav at ganga á biti, er óiva besti mátin at fáa meira burtur úr tí stóru framleiðslu av eti, sum finnist á djúphavinum uttan um oyggjar okkara. Men á sama hátt sum tað hevur tikið eini 10 ár at framala rættu sila- og laksaættirnar innan vanligu alingina í dag og finna rætta handalagið, so eiga vit helst eisini at rokna við 5-10 ára royndararbeiði, áðrenn havbit við laksi gerst lønandi vinna.

Skjótastu framstigini kunnu væntast við miðvísum útveljingararbeiði grundað á 30-50 laksafamiljur.

Um peningur fæst til vega til hetta endamál, hevur forskningssjef Trygve Gjedrem frá Forskningsstasjon for Laksefisk í Noregi, ið er serkønur á hesum øki, játtað at vera við at leggja til rættis eina royndarætlan.

Útreiðslur.

Neyðugt verður at nýta ein part av framleiðsluplássinum hjá p/f Fiskaaling við Áir, í Vestmanna og á Oyrabakka at ala fiskin í, og neyðugt er at keypa ymiska nýggja útgerð, eitt nú at merkja maðkapirrur við. Umframt má í fyrstu syftu eitt fólk setast at taka sær av hesum, seinni tvey.

2. Kalvi.

Bæði skotar og norðmenn arbeiða við kalva. P/f Fiskaaling fór í 1983 undir royndir at gera kalva til alifisk. Arbeitt verður saman við "Akvakulturgruppen" á Norðsjóarsentrinum í Hirtshals og norsku royndarstøðunum.

Útreiðslur til kalvaroyndirnar.

1) Neyðugt verður at gera 2 stór ker at hava kalva gangandi í.
2) Eisini verður neyðugt at gera eina pumpuskipan til sjógv afturat við Áir.
3) Fastar útreiðslur verða av støðugt at pumpa sjógv til rekt av kalvunum og til fóður.
4) Sum frálíður má gerast serstøk klekistøð til kalva og annan fisk úr sjónum.

Inntøkur:

Norðmenn hava arbeitt eini 7 ár við kalva, og onnur 7 kunnu gánga, áðrenn veruligt úrslit fæst.

Vit eiga tó longu nú at vera við í hesum royndararbeiði, tí kalvin er best egnaða fiskaslag at ala í Føroyum, umframt laks og sil, og fyribils helst tað einasta, sum kann væntast at kunna geva lønandi vinnu hjá okkum.

3. Aðrar royndir ið eiga at vera gjørdar:

Viðvíkandi er at fara undir:
a) Royndir at gera sila- og laksafóður úr sørgaðum fiski (fiskaensilagu).
b) Roynt eigur at vera at ala laks í einari eldi 1/2 byrging á Oyrabakka, fyri at fáa vissu fyri, at tað ber til at ala laks til marknaðin í byrgingum av hesum slag. Hetta fer at hava týdning fyri útbyggingarmøguleikarnar innan alivinnuna í Føroyum.
c) Tá tað eydnast at byrjunarfóðra kalvayngulin, eiga royndir at byrja at ala hendan fisk til seluveru í byrgingunum á Oyrabakka. Sum frá líður eisini samstundis sum tú elur laks í byrgingunum.

Figgjan av royndum.

Rakstrin av p/f Fiskaeldi hevur verið positivur seinastu árini.

Royndararbeiði, sum greitt frá omanfyri, krevur sum vera mann rættuliga væl av í-løgum og arbeiði, ið ikki gevur nakað av sær í fyrstu atlegu, og eisini fer tað at skerja beinleiðis seluna hjá p/f Fiskaeldi av byrjunarfóðraðum yngli og smolti og eisini nakað seluna av síli og laksi til útflutnings.

Uttan at vit eru førir fyri at seta nakur skilagóð tøl á hesar broytingar í rakstrinum av p/f Fiskaeldi nú, verður skotið upp at:

1) rakstrarstaðið 1640 Laksa- og silaeldi fær navnabroyting til: 1640 Royndir innan Navbúnað.
2) rakstrarstaðið verður sett Fiskirannsóknarstovuni at ráða yvir til tiltøkar royndir,
3) kr. 2.000.000,- verða settar á figgjarlógina 1985/86 til hetta endamál.

Hjálegt: Avrit av brævi frá forskningssjef Trygve Gjedrem.

VEDR. AVLSFORSØK OG SEARANCHING

Jeg viser til interessante samtaler om spørsmålet da jeg besøkte Færøyene i juni i år.

Jeg kan konstatere at vi vil delta i utforming av et forsøksprosjekt i searanching på Færøyene og gi råd om gjennomføringen av et slikt prosjekt på konsulentbasis.

Dersom det skal bli et interessant prosjekt, bør det over en treårsperiode produseres smolt fra ulike laksestammer og fra ulike familier. Hvert år bør det være 30-50 familier og fra hver familie bør det individmerkes i størrelsesorden 500 smolt. Det er ønskelig at smolten produseres i ett anlegg, men ved utsett av merka smolt bør det fordelet på minst 2 vassdrag og helst 3-4. I disse vassdragene må det bygges lakseтrapp for å muliggjøre registrering av oppgangen av laks.

Dersom det er ønskelig kan vi senere i høst utarbeide forslag til en detaljert forsøksplan.

Jeg legger ved en artikkel som jeg og en av mine studenter utarbeidet i vinter. Den er oversatt til islandsk og vil bli publisert i tidsskriftet Freir.

Að § 16 - 16607 Fiskivinnuráðið
Sbrt. skriv dagfest 11. oktober 1984:

Hjálagt er uppskot til fíggjarlegtingslóg 1985/86 viðvíkjandi rakstrarstaði 16607.

Samstundis er ætlan sett upp fyri 1986/87 og 1987/88.

Kontonummar og navn Rakstrarstað 16607	Rokniskapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87 1 000 kr.	Ætlan 1987/88 1 000 kr.
103509 Samsýningar	120	170	180	180	185	185
113202 Ferða- og dagpen. innanlands	26	50	50	50	55	55
233354 Telefon og telex	2	3	4	4	4	4
	148	223	234	234	244	244

§ 16 - 16904/333017 Minstalon og annar stuðul til fiskivinnuna:

Viðmerkingar landsstýrisins.

Í sambond við uppskot til fíggjarlóg 1985/86 metir sitandi landsstýri tað ikki at vera rætt at taka pol avgerðir, ið føra stórri fíggjarligar broytingar við sær, tað eigur nýggja landsstýrið at gera.

Hetta gev eg serstakliga galdandi fyri tey stóru økini sum sjúkrahúsini, landsverkfrøðingin og stuðul fiskivinnuna.

Landsstýrið hevur tí ikki verulига viðgjørt uppskot til fíggjarætlan fyri minstulen og annan stuðul t' fiskivinnuna.

Í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 1985/86 eru avsettar 260 mió. kr.

Ad § 17 - 17015: Landsdjóralæknin
Sbrt. skriv dagfest 27. september 1984:

Uppskot til fíggjarlegtingalóg 1985/86
Ad. § 17-17015: LANDSDJÓRALÆKNIN
Viðmerkingar:
Ad. 103048: 1 landsdjóralækni
Ad. 103168: 1 hjálpardjóralækni, sáttmáli kr. 193.466,37
eftirlønargjald " 19.346,64
deildarleiðaraviðbót " 30.000,00
reiðiviðbót " 54.309,06
frítíðarmisjavni " 3.720,51

Lagt er upp fyri eini alduraviðbót pr. 1. juli 1985 og vanligari hækking fram til 31. mars 1986 í sama mun sum higartil.

Ad. 253903: Aðrar útreiðslur: Lýsingar, skrivstovulutir, prent, tíðarrit, gjald fyri bakteriu- og virologiskar kanningar, sum ikki kunnu gerast á stovninum.

Kontonummar og navn	Rokningar 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Áætlan 1986/87	Áætlan 1987/88
103048 LØN/TENASTUMENN	271.485	267.2	284.9	284.9	284.9	284.9
103168 LØN/SÁTTMÁLALØNT	266.216	287.8	300.8	300.8	300,8	300.8
113202 FERÐA- OG DAGPENINGUR	36.064	50.0	55.0	55.0	55,0	55,0
103405 LØN/ÚRTÍÐARLØN	0	0	0	0	0	0
213606 LEIGUÚTREIÐSLUR	3.000	3.0	3.0	3.0	3,0	3,0
233259 POSTGJALD	768	1.0	1.2	1.2	1,2	1,2
233354 TELEFON/TELEX	4.046	7.0	7.5	7.5	7,5	7,5
253903 AÐRAR ÚTREIÐSLUR	27.677	40.0	50.0	50.0	50,0	50,0
	609.256	656.0	702.4	702.4	702,4	702,4

Að § 17 - 17048 Landbúnaðarráðsgevarin
Sbrt. skriv dagfest 2. oktober 1984:

Landbúnaðarráðsgevarin: fíggjarlógaruppskot fyri fíggjarárið 1985/86.

	Roknskapur: 1983/84	Játtan: 84/85	Uppskot stovnsins: 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Áætlan 1986/87
103048: Lan-lønarstumaður	197.480	205.000	221.000	221.000	221.000
103222: Leiga av heli,el, vask v.m.	14.000	12.000	14.000	14.000	14.000
113202: Bilur - ferðing	42.530	45.000	55.000	55.000	55.000
233051: Innbúgv	o *	5.000	5.000	5.000	5.000
233155: Prentlutir	5.980	6.000	6.500	6.500	6.500
233259: Postgjald	560	1.500	1.000	1.000	1.000
233354: Telefon-telex	3.435	7.000	5.000	5.000	5.000
233561: Aðrar skrivstovuútreiðslur	866	2.000	2.000	2.000	2.000
253903: Aðrar útreiðslur, skeiðvirks.	8.464	12.000	12.000	12.000	12.000
17048: Landbúnaðarráðsgevarin	273.315	295.500	321.500	321.500	321.500

Viðmerkingar:

103048: Lønarramma 20.-24.-29.-31.
103222: Reingerð, el, hiti og leiga av heli frá Føroya Jarðarráð.
113202: Bilur keyptur 14/2-83 og ferðaútr. innanlands.
233051: Skrivstovuamboð og annað innbúgv.
233155: Bøkur, blað, tíðarrit v.m. innan- og uttanlands.
233259: --
233354: --
233561: Pappír, konvuluttar og vanlig skrivstovuútgerð.
253903: Møguligt skeiðvirksemi uttanlands. Aðrar smærri útreiðslur, ið kunnu koma fyri, men sum ikki eru roknaðar í omanfyristandandi konti.

Ad § 17 - 17053 Seyðaráðgevari og seyðaroyndir
Sbrt. skriv dagfest 21. september 1984:

Frá Landsstýrinum er biðið um at fáa figgjaretlan fyri seyðaráðgevarin 3 ár framm. 1985/86 - 86/87 - 87/88.
Um hendan figgjaretlanin,sum her er sett upp fyri 1985/86 verður fylgd í ár sum hon er,so meti eg at arbeiðið kann lagast so,at hon óbroytt kann halda eini 3 ár framm.
Saman við figgjaretlanini og viðgerð av seyðarekt yvurhevur er frágreiðing við yvurlitið yvur arbeiðið á Oyri - gjørt upp seinasta vetur ,fyri 9 ár - lagd við her.

Kontonummar og navn Rakstrarrætað 17053	Roknskapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
103509 - Samsýningar	66000	69000	84000	73000	73000	73000
113202 - Ferða og dagpengar	14672,60	15000	16000	16000	16000	16000
253903 - aðrar útreiðslur						
Kunsttíð til Fam' ,Gatu						
Oyri og Porkeri	19032,34					
Seyðamedisin,o.a - Oyri	1622,45					
Hegn,peler o.a. oyri	4071,05					
2 el - klippemaskinur	5887,00					
seyðavekt	6427,30					
Klippestol	1824,84					
3 brundseyðir - Oyri	3900,00					
Seyðahúslán - Oyri,rentur og						
avdrag	11313,60					
Aðrar útreiðslur í alt	54078,68	54000	60000	60000	60000	16000
Talmi samantald	134751,28	138000	160000	149000	149000	149000
Konto nr.113202 hevur avlop		327,40 kr.				
Konto nr.253903 er yvurtrekt við		78,68 kr.				
Avlop		248,72 kr.				

Að § 17-17103 Matrikulstovan
Sbrt. skriv dagfest 15. november 1984:

Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1985/86, rakstrarstað 17103-Matrikulstovan.

Við hesum verður uppskot til fíggjarløgtingslóg 1985/86, samanborin við roknskapin 1983/84 og játtanina 1984/85, somuleiðis ætlan fyri 1986/87 og 1987/88, send Landsstýrinum.

		Roknsk. 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
		1000 kr.	1000 kr.			1000 kr.	1000 kr.
103048	løn tænastumenn	1.008.3	1.130.0	1.257.0	1.257,0	1.257.0	1.257.0
103143	- starvsfólk	2.940.0	3.177.0	3.871.0	3.583,3	3.583,3	3.583,3
103222	- reingerð	119.5	130.0	135.0	135,0	135.0	135.0
103288	- bønafólk	135.5	123.0	135.0	135,0	135.0	135.0
113202	ferða- og dagpen.	140.1	160.0	160.0	160,0	160.0	160.0
213806	leiguútreiðslur	339.2	250.0	380.0	380,0	380.0	380.0
213105	el-hiti og vask	70.6	75.0	80.0	80,0	80.0	80.0
253306	umboð-keyp-umsiting	536.5	800.0	1.000.0	800,0	600.0	400.0
233051	innbúgv	72.9	50.0	75.0	75,0	75.0	75.0
253928	tænastuskfar	79.5	170.0	80.0	80,0	200.0	80.0
253123	tilfar-skrivst.-tekn.	105.5)					
253123	- uppmáling	85.0)	500.0	700.0	700,0	500.0	500.0
253123	- fotokop. o.a.	108.5)					
253123	kortkonst.-luftfoto	919.6)					
233259	postgjald	17.1	20.0	25.0	25,0	25.0	25.0
233354	telefon, lýsingar	72.5	85.0	90.0	90,0	90.0	90.0
253903	aðrar útreiðslur	112.1	60.0	70.0	70,0	70.0	70.0
83904	+ inntøkur	2.349.3	1.600.0	2.000.0	2.000,0	2.000.0	2.000.0
		4.515.1	5.130.0	6.058.0	5.690,3	5.290,3	4.970,3

Viðmerkingar til uppskotið

Roknað verður við hesi manning:

Tænastumenn:

stjóri	36. lønarrammu
1 landmálari	31. —
1 —	29. —
2 hjálparlandmálarar	20. —
1 —	17. —

Sáttmálaløn fólk:

3 landmálarar — løntir eftir sáttmála fyri sivilverkfrøðingar
7 hjálparlandmálarar (matrikultekn.) — løntir eftir sáttmála við Teknikaraf.
2 næmingar — løntir eftir sama sáttmála
4 teknarar — løntir eftir sama sáttmála
1 næmingur — løntur eftir sama sáttmála
1 bókhaldari — løntur eftir sáttmála við Starvsmannafelagið
1 yvirassistentur — løntur eftir sama sáttmála
4 skrivstovufólk — lønt eftir sama sáttmála
2 fotoarbeiði o.a. — lønt eftir sama sáttmála

Lønir:

Tænastumenn:

stjóri		kr.	264.000,-
landmálari	1	—	247.770,-
—	2	—	239.800,-
hjálparlandmálari	1	—	172.586,-
—	2	—	172.586,-
—	3	—	159.134,-
		kr.	1.256.636,-

Starvsfólk:

landmálari	3	kr.	277.786,-
—	4	—	221.116,-
—	5	—	212.835,-
hjálparlandmálari	4	—	166.172,-
—	5	—	166.172,-
—	6	—	166.172,-
—	7	—	166.172,-
—	8	—	152.215,-
—	9	—	151.573,-
—	10	—	149.648,-
næmingur	1	—	66.457,-
—	2	—	66.457,-
tekniskur teknari	1	—	158.471,-
— —	2	—	158.471,-
— —	3	—	149.648,-
— —	4	—	146.119,-
næmingur	1	—	54.918,-
bókhaldari	1	—	173.862,-
yvirassistentur	1	—	171.930,-
skrivstovufólk	1	—	154.578,-
—	2	—	154.578,-
—	3	—	142.211,-
—	4	—	141.567,-

fotoarbeiði o.a.	1	—	151.532,-
—	2	—	150.000,-
		kr.	3.870.660,-
	tilsamans		kr. 5.127.296,00

Hvat lønum viðvíkir, verður víst til leiðbeining landsstýrisins.

Roknað er við teimum lønarviðbótum, ið avtalaðar eru, somuleiðis aldursviðbótum, ið gera seg galdandi í fíggjarárinum 1985/86.

Harumframt er roknað við 3 prístalsviðbótum, sammett við støðuna 1. juli 1984.

103143 Í uppskotinum er roknað við tí fólki, sum arbeiðir við stovnin í dag, at settur verður 1 fotografur og 1 næmingur afturat til teknistovuna.

Sum fyrr viðmerkt í uppskoti til fíggjarlóg setir nútíðar kortteknikkur stór krøv til fotodeildina, og tá nú eisini verður farið undir úttekning, ið setir serlig krøv, meta vit, at tað er umráðandi, at loyvt verður at seta ein fotograf við serkunnleika á hesum øki at leiðbeina og læra frá sær soleiðis, at besta góðskan fæst úr verandi myndatilfari. Mælt verður til, at setanin verður fyribils, galdandi fyri 2 ár.

103222 Víst verður til roknskapin 1983/84 og játtanina 1984/85, og er roknað við, at útreiðslan til reingerð verður 135 tús.

103288 Í fíggjarárinum 1983/84 vórðu nýttar 135 tús. serliga til hjálparfólk við marknaseting og málihjálp.

Internationala samskipanin IAESTE hevur seinastu árini biðið um, at Matrikulstovan tekur studentar, serliga verkfrøðingar við landmáling sum sergrein til praktiska uppvenjing í 2 mánaðir um summarið.

Hetta er tann tíðin, ið Matrikulstovan serliga hevur brúk fyri fólki til útiarbeiði. Roknað er við 2 studentum komandi summar.

113202 Víst verður til roknskapin 1983/84 og játtanina 1984/85.

213806 Roknað er við gólvvídd umleið 750 m², sum sambært nýggja leigusáttmálanum 1. apríl 1983 er kr. 480,-.

213105 Í 1983/84 vórðu nýttar 70 tús., og er útreiðslan ætlað til 80 tús.

253306 Her verður bókað landmálingarinstrument, skrivi- og roknimaskinur. Játtanin 1984/85 er 800 tús.

Sum greitt frá í tveimum teimum seinastu uppskotunum til fíggjarløgtingslóg hevur Matrikulstovan fyrireikað keyp av analytiskum útteknингartóli soleiðis, at møguleiki er fyri, at stovnurin sjálvur kann gera kort eftir teimum loftmyndum, ið eru tøkar. Samsvarandi hesum hevur verið søkt um játtan á fíggjarlógini, men av ymiskum orsøkum hevur málið verið drigið út.

Tøkar eru nú kr. 900 tús. fíggjarárini 1983/84 og 1984/85, søkt verður tí um restkostnaðin í komandi fíggjarári 1985/86 — 1 milión kr. Samlaði kostnaðurin er umleið 1,9 milión uttan toll.

233051 Sambært roknskapinum 1983/84 eru nýttar 73 tús., og verður roknað við somu upphædd.

253928 Til viðlíkahald av 4 tænastuakførum er roknað við 80 tús., og verður ein bilur keyptur sambært langtíðarætlanini 1986/87.

253123 Vísandi til roknskapin 1983/84 vórðu nýttar umleið 300 tús. til skrivstovu- og uppmálingartilfar og tilfar til fotodeildina. Roknað verður við líknandi upphædd 1985/86 og 400 tús. til kortkonstruktión.

233259 Víst verður til roknskapin 1983/84.

233354 Í roknskapinum 1983/84 eru nýttar 72 tús., og verður útreiðslan mett til 90 tús.

253903 Á hesi konto verða bókaðar yvirútskiftingarútreiðslur v.m., og var játtanin 1984/85 60 tús.

83904 Inntøkurnar eru mettar til 2 miliónir, av hesum umleið 900 tús. í gjøldum fyri matrikulerar broytingar og annars kommunali parturin av

matrikulering, eigaranna partur av útskifting og søla av kortum, myndum o.a.

— -- -- -- —

Viðmerkingar landsstýrisins:
Ikki tikið við í uppskoti landsstýrisins:
1 skrivstovufólk kr. 141.567,-
1 tekniskur teknari kr. 146.119,-

— -- -- -- --

Ad § 17-17205 Royndarstøð:
Landsstýrið skjýtur upp, at avsettar verða í 1984/85:

Rakstur	1.000.000 kr.
í grunn	6.000.000 —
	7.000.000 —

Ad § 17-17901/343054-343062-343021-343013-343033
Føroya Jarðarráð
Sbrt. skriv dagfest 15. oktober 1984:

./. Viðlagt fíggjarætlan fyri 1985/86, ið umfatar:

mjólkarstudning
studning til kjøt og egg
studning til súrhoyggjabrunnar

studning til stráfóður
veltistudning
húsdýralógina
íløgur í Jarðargrunnin og
rentustudning

× 1000	Roknskapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
studningur til mjólkarframleiðslu	6.482.095,46	7.724	9.820	9.820	10.800	11.500
studningur til kjøt og egg viðm.			1.700	1.700	1.800	1.900
studningur til súrhoyggjabrunnar	47.453,60	950	950	950	950	950
studningur til stráfóður		800	900	900	900	900
nýdyrking v.m.	2.399.373,93	1.800	2.000	2.000	2.000	2.000
húsdýraaling	311.036,39	275	300	325	325	350
íløgur í Jarðargrunnin	3.800.000,00	4.000	5.800	5.800	7.000	8.000
rentustudningur	2.000.000,00	2.200	2.300	2.300	2.400	2.400
mett yvirnýtsla 1984/85			950	950		

Viðmerkingar til mjólkarstudningin:

Ráðið metir tað rætt, at studningurin til mjólkarframleiðsluna verður á eini konto fyri seg, meðan studningurin til neytakjøt, svínakjøt og egg verður fyri seg.

Mjólkarmongdin, sum studningur varð latin til í 1983/84, var 3.742.327 litrar til mjólkarvirkini og 17.089 litrar sum privatsøla. Framleiðslan í 1983/84 vaks við 2,5% í mun til árið fyri.

Neytakjøtframleiðslan var 100.369 kilo.

Tá seinasta fíggjarætlanin varð gjørd, var roknað við 2,5% vøkstri í 1984/85. Henda meting vísir seg als ikki at halda, so sum hjálagda yvirlit yvir metingina av studningunum fyri 1984/85 vísir.

Út frá einum mettum vøkstri uppá 20% fyri 1984/85 og einum nakað minni fyri 1985/86 verður roknað við, at mjólkarmongdin til mjólkarvirkini í 1985/86 verður 5 mill. litrar.

Vísandi til skriv ráðsins til landsstýrið, dagfest 10. oktober 1984, ið er hjálagt, verður skotið upp, at latin verður javningarstudningur fyri mánaðirnar sept.-dec.

Ráðið skjýtur upp hesar studningsupphæddir:

studningur til 1. floks mjólk	kr. 1,25/l.
javningarstudningur (sept.-dec.)	— 0,35/l.
flutningsstudningur	— 0,45/l.

Góðskubýtið verður mett soleiðis:

1. flokkur	92,0%
1. flokkur	4,5%
3. flokkur	2,5%
4. flokkur	1,0%

ið gevur ein miðalstudning uppá kr. 1,18/liturin.

Útgreiningin av mjólkarstudninginum verður sostatt:

mjólk, seld til virkini	5.900.000 kr.
javningarstudningur	490.000 —
privatsøla	10.000 —
rakstrarstudn. til mjólkarvirkini	1.250.000 —
flutningsstudningur	2.160.000 —
rómi	10.000 —
íalt	9.820.000 —

Viðmerkingar til kjøt og egg:

Roknað er við einum 110 tonsum av neytakjøti, og er studningurin settur til kr. 10,00 á kilo.

Fyri svínakjøt og egg eru somu upphæddir settar á, sum mett verður fyri 1984/85 sambært kunngerð frá 17. mai 1984, ávikavist kr. 250.000,00 og kr. 350.000,00.

Viðmerkingar til súrhoyggjabrunnastudningin:
Hóast studningurin hevur ikki verið uppbrúktur seinastu árini, er sama upphædd sett á sum seinasta ár. Hetta m.a. tí at studningurin er munandi hækkaður.

Viðmerkingar til uppdyrkingina:
Í 1984/85 vóru veltir 280.907 m² úr nýggjum og 117.043 m² vóru umvældir. Tað vóru 2708 m gjørdir av traktorvegum. Umleið 45.000 m² eru veltir aftrat, men eru ikki avgreiddir.

Nýdyrkingin ætlast at vera nøkulunda tann sama fyrstu árini framyvir, meðan tað helst verður meira gjørt við at fáa traktorvegir á teimum nýdyrkaðu lendunum.

Meirinýtslan á hesi konto í 1983/84 skyldast, at stráfóðurstudningur varð goldin av hesi konto fyri 1982 og 1983.

Leggjast kann aftrat, at ráðið í samstarvi við við Skeljavirkið á Oyri útvegar monnum, ið velta, knústar skeljar at kálka við.

Viðmerkingar til húsdýralógina:
Meirinýtslan fyri 1982/83 skyldast í fyrsta lagi keyp av kleyvaboksum fyri umleið kr. 66.000,00. Metir ráðið hetta tiltak hava avbera avgerandi týdning fyri neytahaldið eins og studningurin til seyðavaskibrunnar, sum var kr. 45.000,00 í 1983/84.

Eisini seyða- og neytapremiurnar eru hækkaðar.

Íleggingar og rentustudningur:
Grunnurin tók í 1982 eitt uttanlandslán, stórt kr. 4,1 mill. DM. Lánið er avdrátarfrítt í 6 ár og skal síðan gjaldast aftur yvir 4 ár.

Mett verður tí rímiligt at leggja niðurfyri til hesa afturgjalding, og er m.a. tí upphæddin vaksin.

Viðmerkingar til stráfóðurstudningin:
Orsakað av stráfóðurstudninginum og av, at tey nýveltu lendini bera meira gras, verður roknað við vaksandi stráfóðurmongd.

Viðmerkingar til yvirnýtslu:

Í skrivi, dagfest 10. oktober 1984 til Føroya Landsstýri verður heitt á Landsstýrið um at fáa loyvi til at nýta uml. kr. 420.000,00 til javningarstudning til mjólk.

Viðgerð landsstýrisins er ikki liðug, nú fíggjarætlanin verður gjørd, men um so er, at hetta loyvið verður givið, verður samlaða yvirnýtslan kr. 950.000,00.

Um landsstýrið hevur ætlanir um at nýta pening av festikonto Royndarstøðarinnar í 1985/86 til nýggju royndarstøðina í Kollafirði verður neyðugt at hækka rentustudning og íløgustudningin samsvarandi.

So sum hjálagda strikumynd 1) vísir, er mjólkarmongdin til Mjólkarvirki Búnaðarmanna vaksin nógv, tað sum farið er av 1984.

Leggjast kann aftrat, at vøksturin apríl-august 1984 er 29%, meðan hann á Suðuroyar Margarinvirki er enn størri, nevniliga 45%.

Sama strikumynd vísir eisini, at ójavnin gjøgnum árið gerst alt størri.

Hetta førir við sær, at mjólkarvirkini hava trupulleikar at sleppa av við alla mjólkina, tá mest er til.

Sjálvt um tað hevur eydnast at økt søluna munandi, so hevur MBM ikki sloppið av við 180.000 kg í tíðarskeiðnum apríl til august 1984.

Sjálvt um rómin er tikin av hesi mjólkini, so rakar tað fíggjarliga meint, og missurin hjá mjólkarvirkinum rakar í seinna enda framleiðararnar.

Eitt tiltak at bøta um henda ójavna er at lata javningarstudning, tá framleiðslan er minst.

Fyri at ein tílíkur studningur skal byrja at virka komandi ár, er umráðandi, at hann kemur í gildi longu nú, og verður tí skotið upp at játta kr. 0,35/kg til mjólk, ið framleiðarar lata mjólkarvirkjunum í september-december.

Samanborið við seinasta ár og við vøkstrinum í huga verður tað ætlandi talan um 1,2 mill.kg ella kr. 420.000,00, og verður søkt um at flyta henda pening frá kontoini: studningur til súrhoysbrunnar.

Sambært hjálagda yvirlit verða tað aðrar studningskonti, ið sambært meting verða yvirtrektar, tá fíggjarárið 1984/85 er úti, og skal eisini greiðast frá tí her.

Av kontoini: Nýdyrking v.m. er stráfóðurstudningur útgoldin fyri 2 ár (1982 og 1983), soleiðis at tað fyri 1983/84 reelt er talan um eitt avlop uppá uml. kr. 300.000,00.

Konto: *Húsdýralóg*
Av hesi konto er útgoldið umleið kr. 66.000,00 til keyp av kleyvaboksum, eisini er studningurin til rættir (vaskibrunn) væl hægri enn áður, kr. 45.000,00.

Konto: *Studningur til mjólkarframleiðslu:*
So sum víst á serstøkum yvirliti skyldast hesin vøkstur partvís óvanliga stóru framleiðsluøkingina, og partvís at studningur nú eisini verður veittur til svínakjøt og egg — ialt kr. 600.000,00.

— — — — —

1) Strikumyndin ikki hjáløgd.

	kr.
Nýdyrking v.m.:	
flutt 1983/84	÷ 600.000
mett nýtsla 1984/85	1.500.000
ialt	2.100.000
játtan 1984/85	1.800.000
at flyta	÷ 300.000
Súrhoysbrunnar:	
flutt 1983/84	÷ 900.000
mett nýtsla 1984/85	800.000
ialt	100.000
játtan 1984/85	950.000
at flyta	÷ 1.050.000
Húsdýralógin:	
flutt 1984/85	÷ 80.000
mett nýtsla 1984/85	300.000
ialt	380.000
játtan 1984/85	275.000
at flyta	÷ 105.000

Mjólk v.m.:

flutt 1983/84	0
mett nýtsla 1984/85	8.900.000
íalt	8.900.000
játtan 1984/85	7.724.000
at flyta	÷ 1.176.000

Viðmerkingar til mjólkarstudningin:

Økstur apríl-august 1984/85

Mjólkarvirki Búnaðarmanna	29,3%
Suðuroyar Margarinvirki	45,4%

Framleiðsla:	1983/84	mett 1984/85 (÷20%)
MBM (÷T.M.&M.)	3.544.816 kg	
Suðuroyar Marg.	197.511 —	
	3.742.327 kg	4.490.792 kg

Góðskuflokkingin fyri virkini frá september 1983 til august 1984 er:

1. fl.	90,8%
2. fl.	4,5%
3. fl.	2,5%

Hetta gevur ein miðalstudning uppá kr. 1,02/kg

Studningur til mjólkarvirkir	kr.	4.580.607
— fyri privatselda mjólk	—	8.000
Rakstrarstudningur	—	1.122.698
Flutningur	—	1.720.000
Kjøtstudningur	—	850.000
Rómi	—	1.000
Grísakjøt	—	250.000
Egg	—	350.000
íalt	kr.	8.882.305

Samandráttur:

(mett)	at flyta frá 84/85
	kr.
Nýdyrking/stráfóður	÷ 300.000
Súrhoysbrunnar	+ 1.050.000
Húsdýralógin	÷ 105.000
Stráfóður	0
Mjólk v.m.	÷ 1.176.000
	÷ 531.000

Ad § 17-17901/343079 Træplanting
Sbrt. skriv dagfest 30. september 1984:

Viðvíkjandi kt. 723000-723867 skógfriðingarnevndin
Rakstrarstaður 61017 Føroya Gjaldstovu
Rakstrarstaður 11276 Føroya Landsstýris

Við hesum letur nevndin Føroya Landsstýri uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 1985/86.

Biðið verður um landskassastudning upp á íalt kr. 1.170.000.

Viðløgd skjøl:
1. Fíggjarætlanaruppskot, 2 bløð
2. Viðmerkingar til uppskot, 3 bløð
3. Serligir formularar, skjal I og II
4. Yvirlit yvir plantingarstøðir, 1 blað
5. Ognaruppgerð, aktiv og passiv konti

Fíggjarætlanaruppskot 1985/86

823000	*Inntøkukonti, felags*	*Uppskot fyri 85/86*
723013	Landskassastudningur	1.170.000,- kr.
723021	Søla av plantum	150.000,-
723038	Arboretið, trø til viðalundir	250.000,-
	Inntøkur tilsamans:	1.570.000,-

723062	*Útreiðslukonti, felags*	
723079	Keyp av plantum	90.000,-
723087	Lønir	400.000,-
723095	Rakstur, bilar v.m.	40.000,-
723109	Keyp av amboðum	120.000,-
723117	Ferðaútreiðslur	25.000,-
723125	Telefon, skrivstovuhald, lýsingar	30.000,-
723133	Aðrar útreiðslur	5.000,-
723141	Arboretið	70.000,-
723158	Umboðan	10.000,-
723166	Tøð, hegn v.m.	50.000,-
723174	Skógfriðingarnevndin	30.000,-
	Tilsamans:	870.000,-

723204	*Útreiðslukonti, viðalundir í Tórshavn*	
723212	Keyp av plantum	120.000,-
723229	Lønir	275.000,-
723237	Umvælingar	5.000,-
723245	Ferðaútreiðslur	0,-
723253	Aðrar útreiðslur	2.000,-
	Tilsamans:	402.000,-

s. 187:

723308	*Útreiðslukonti, viðalundir í Norðoya sýslu*	
723316	Keyp av plantum	10.000,-
723324	Lønir	20.000,-
723332	Umvælingar	5.000,-
723349	Ferðaútreiðslur	5.000,-
723357	Aðrar útreiðslur	500,-
	Tilsamans:	40.500,-

723403	*Útreiðslukonti, viðalundir í Eysturoyar sýslu*	
723411	Keyp av plantum	5.000,-
723428	Lønir	40.000,-
723436	Umvælingar	10.000,-
723444	Ferðaúteiðslur	4.000,-
723452	Aðrar útreiðslur	5.000,-
	Tilsamans:	64.000,-

723507	*Útreiðslukonti, viðalundir í Streymoyar sýslu*	
72315	Keyp av plantum	2.000,-
723523	Lønir	15.000,-
723531	Umvælingar	10.000,-
723548	Ferðaútreiðslur	500,-
723556	Aðrar útreiðslur	200,-
	Tilsamans:	27.700,-

723602	*Útreiðslukonti, viðalundir í Vága sýslu*	
723619	Keyp av plantum	15.000,-
723627	Lønir	10.000,-
723635	Umvælingar	0,-
723643	Ferðaútreiðslur	5.000,-
723651	Aðrar útreiðslur	100,-
	Tilsamans:	30.100,-
723801	*Útreiðslukonti, viðalundir í Suðuroyar sýslu*	
723818	Keyp av plantum	60.000,-
723826	Lønir	49.700,-
723834	Umvælingar	5.000,-
723842	Ferðaútreiðslur	10.000,-
723859	Aðrar útreiðslur	1.000,-
723867	Rakstur av húsunum	10.000,-
	Tilsamans:	135.700,-
Útreiðslur tilsamans		1.570..000,-
1985/86	Útreiðslukonti 723062-723867	1.570.000,-
	Inntøkukonti 723021-723038	400.000,-
Umbiðin landskassastudningur 1985/86		1.170.000,-

s. 188:

Viðmerkingar til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri skógfriðingarnevndina 1985/86

723000	*Inntøkukonti, felags*
723013	*Landskassastudningur:* Munurin millum útreiðslu- og inntøkukonti
723021	*Søla av plantum:* Søla av plantum til privat (burtur av tí, sum verður keypt av plantum uttanlands og av plantum úr Arboretinum)
723038	*Arboretið:* Plantur, sum eru aldar fram í Arboretinum, og sum verða settar út í viðalundirnar. Upphæddirnar eru eftir uppgerð skógfútans um, hvussu mangar plantur eru niðursettar á hvørjum staði.

Arboretið verður krediterað og viðalundirnar debiteraðar. Planturnar hava ymiskt virði (frá 8 til 150 krónur). Her verður nýtt eitt lágt tal eftir bestu meting.

723062 *Útreiðslukonti, felags*

723079 *Keyp av plantum:* Samsvarar kostnaðinum av plantum, sum verða keyptar uttanlendis (til sølu til privat, til niðurseting í plantuskúla og niðurseting í viðalundum beinan vegin)

723087 *Lønir:* Lønir til skógfútan og tímalønt fólk faklært/ófaklært til alingararbeiði á alistøðini í Hoydølum.

723095 *Rakstur, bilar v.m.:* Bensin/olja, umvælingar av bilum, traktorum, gravimaskinum, fresarum o.t. Umvælingar av arbeiðshúsum og skúrum v.m. Tekniskar umvælingar.

723109 *Keyp av amboðum:* Ætlanin er at keypa nýggjan, 4-hjólsdrignan jeep. Tann uppsetta upphæddin verður víst í minna lagi.

723117 *Ferðaútreiðslur:* Viðvíkjandi tænastuferðum skógfútans, innan- og uttanlendis og annara, sum starvast við ella hava serstakligt tilknýti til stovnin (umboðan á ársfundum Nordisk Arboretudvalgs).

723125 *Telefon, skrivstovuhald, lýsingar:* Stovnurin nýtir privattelefon skógfútans, og fær hann endurgjald samsvarandi. Skrivstovuhaldið umfatar tann vanliga raksturin og verður umsitið av tímaløntum fólki eftir tørvi. Lýsingar viðvíkja plantusølu o.t.

723133 *Aðrar útreiðslur*

723141 *Arboretið:* Verður rikið á norrønum grundarlag í vísindaligum samstarvi við hini Norðurlondini. Her snýr tað seg um nýroyndir við fremmandum plantutilfari, og er neyðugt við serkønari ráðgevarahjálp. Okkara partur av hesum samstarvi er at lata ferðapening og gjald fyri innivist umframt smærri samsýningar til teir útlendsku serkønu, sum eftir áheitan frá nevndini koma higar á hvørjum ári. Herundir innsavning uttanlands.

723158 *Umboðan:* Viðvíkur vanligum blíðskapi ímóti teimum fremmandu, sum koma higar. Annaðhvørt serkønum ella øðrum vitjandi úr ymsum londum, sum hava serligan áhuga og kunning til plantingarroyndir í Føroyum, ella sum hava gjørt okkum munagóðar tænastur (við t.d. ókeypis sendingum av plantingartilfari).

723166 *Tøð og hegn o.t.:* Fyri skjótari gróður av niðursettum og meira framkomnum plantum gerst neyðugt við nógv meira taðing enn higartil. Ætlandi verður eisini tørvur á munandi meira inngirðing við hegni í komandi fíggjarári. Umframt allar plantingar í Føroyum.

723174 *Skógfriðingarnevndin:* Herundir útreiðslur til fundir í nevndini, fundarpeningur, ferðapeningur, møguliga gjald fyri vistarhald og/ella vikar.

723204-723867 Útreiðslukonti ymsu viðarlundanna, skipaðar eftir sýslum.
Samanber viðlagt yvirlit yvir viðalundir.

Keyp av plantum: Skuldskriving (sýsluvís + Tórshavn) fyri latið plantutilfar til niðurseting úr alistøðini (arboretinum).
Alistøðini/Arboretinum verður góðskrivað samsvarandi.

Lønir: Lønarútreiðslur eftir bestu meting til tær ymisku viðarlundirnar/plantingarnar. Viðroknað verður bæði lokal arbeiðsmegi og tann, sum verður send út frá alistøðini úr Hoydølum.

Arbeiðini umfata alt, sum hevur við viðarlundirnar og teirra forsvarliga rakstur at gera: inngirðing, grevstur av veitum, úttynning, nýplanting o.s.fr.

Umvælingar: Mettar upphæddir til umvæling av inngirðing, portrum, gongugøtum o.s.fr.

Ferðaútreiðslur: Flutningur av arbeiðsfólki, bilum og góðsi millum alistøðina og arbeiðsplássini (ferðaseðlar etc.).

Aðrar útreiðslur: Ymsar aðrar útreiðslur, sum ikki koma inn á onnur konti.

Skógfriðingarnevndin
september 1984

Yvirlit yvir plantingar undir skógfriðing (arbeiðspláss)

Norðoya sýsla:	Mikladalur	2,0 ha		
	Kunoy	1,5		
	Klaksvík	2,5	tils.:	6,0 ha
Eysturoyar sýsla:	Lorvík	0,5 ha		
	Sølmundarfjørður	1,0		
	Selatrað	1,5	—	3,0 —
Streymoyar sýsla:	Hvalvík	1,0 ha		
	Kirkjubøur	2,0	—	3,0 —
Tórshavn:	Havnardalur	50,0 ha		
	Marknagil	3,0		
	Í Grið (v/ Landav.)	1,0		
	Í Kerjum (v. Grótbrotið)	2,5		
	Debesartrøð (er Müllar bøur) v.m.	2,0		
	Gundadalur	9,0		
	Í Sortudíki	0,5		

	Ovaru Hoydalir		
	Miðhoydalir	5,0	
	Niðaru Hoydalir	3,5	— 76,5 —
Vága sýsla:	Miðvágur, Ellisheimið		
	— , í Tungu	1,0	— 1,0 —
Suðuroyar sýsla:	*Tvøroyri/Trvágur*		
	Sevmýri	0,5 ha	
	Kirkjan	0,5	
	Sjúkrahúsið	1,0	
	Mangibakki og Perssons trød	5,0	
	Vágur	4,0	— 11,0 —
	Tilsamans:		100,5 ha

25 arbeiðspláss

s. 191:

Fíggjarætlanaruppskot 1985/86 *oktober 1984*

Aktiv og passiv konti

723905	*Aktiv konti:*		
723913	Fresari + tilh.	50.000,-	
	Gamal jeepur	4.000,-	
	Vøruvognur	000,-	
	Rennugravari	30.000,-	
	2 gl. motorsagir	1.000,-	
	1 kjarrsag	1.000,-	
	Hondamboð, spakar v.m.	5.000,-	
	Plantumyndasavn:		
	fototól, diasvísari v.m.	2.500,-	68.000,-

723921	Sevmýri: viðalund og hús	100.000,-	
	Selatrað: viðalund	250.000,-	
	Trongisvágur: ein partur av viðal.	20.000,-	
	Kirkjubø: viðalund	50.000,-	420.000,-
723954	*Passiv konti:*		0,-

Økið í Hoydølum (alistøðin/Arboretið) við ástandandi húsum er leigað frá Tórshavnar kommunu fyri 100 ár. árlig leiga: 3.000 krónur.

— — — —

Viðmerkingar landsstýrisins:
Uppskot landsstýrisins er at játta kr. 900.000.

Ad §18 - 18109 Arbeiðseftirlitið

Sbrt. skriv

Konto		Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætl. 1987
83904	Ymiskar inntøkur	÷ 30.000,-	÷ 32.000,-	÷ 32.000	÷ 35.000,-	÷ 37.0
103143	Løn - starvsfólk	685.900,-	743.100,-	743.100	780.300,-	819.3
103168	Løn - sáttmálalønt	263.000,-	272.520	272.520	284.460,-	295.5
103222	Løn - reingerð	28.000,-	32.600,-	32.600	34.200,-	35.9
103405	Løn - úrtíðarløn	45.000,-	45.000,-	45.000	45.000,-	45.(
103509	Samsýningar	84.600,-	89.600,-	89.600	94.080,-	98.7
113202	Ferða- og dagpeningur (innanlands)	73.700,-	85.500,-	85.500	88.100,-	90.7
123103	Skeið og onnur upplýsing ...	107.000,-	115.000,-	115.000	119.600,-	124.(
203308	Lýsingar	12.000,-	14.000,-	14.000	15.500,-	16.(
204303	Dagbløð, tíðarrit v.m.	0,-	6.300,-	6.300	6.700,-	6.(
203507	Umboðan	0,-	12.000,-	12.000	12.000,-	12.(
213105	El, hiti og vask	14.000,-	17.000,-	17.000	17.800,-	18.
213806	Leiguútreiðslur	113.000,-	118.000,-	118.000	123.000,-	128.
233051	Innbúgv	59.000,-	151.350,-	151.350	54.000,-	70.
233155	Prentlutir	50.000,-	55.000,-	55.000	57.700,-	60.
233259	Postgjald	3.000,-	4.000,-	4.000	4.500,-	5.
233354	Telefon og telex	30.000,-	40.000,-	40.000	42.000,-	44
233504	Sakkøn hjálp	10.000,-	12.000,-	12.000	12.600,-	13
233561	Aðrar skrivstovuútreiðslur ...	35.000,-	40.000,-	40.000	42.000,-	44
253467	Trygdarútgerð	0,-	5.500,-	5.500	5.500,-	5
falt		1.583.700,-	1.827.470,-	1.827.470	1.815.040,-	1.896

	do ½ dags arbeiðsmedisinari	kr. 120.000,00
	do frítíðaravloysari	kr. 25.000,00
	Bruttoløn starvsfólk íalt	kr. 743.100,00
ad. konto nr. 103168	Bruttoløn leiðara	kr. 273.520,00
ad. konto nr. 103222	Reingering økt til	kr. 32.600,00
ad. konto nr. 103405	Sambært sáttmála hava eftirlitsmenn rætt til yvirtíð	kr. 45.000,00
ad. konto nr. 103509	Landskassans partur av løn til justermeistara ..... kr. 84.600,-	
	dýrtíðarhækking 5.000,-	kr. 89.600,00
ad. konto nr. 113202	Ferða- og dagpeningur innanlands. Vegna økta vitjan á virkjum verða hesar útreiðslur størri — ætlað	kr. 85.500,00
ad. konto nr. 123103	*Skeiðvirksemi og onnur upplýsandi tiltøk*	
a.	Arbeiðseftirlitið byrjaði seinasta ár at koyra sertifikatskeið fyri trukkførarar, og eydnaðist hetta sera væl — u.l. 150 persónar hava fingið hetta prógv. Ætlanin er at halda fram við hesum tiltaki.	
	Útreiðslur pr. ár ..... kr. 81.000,-	
	Landskassans partur:	
	⅔ × 81.000,-	kr. 54.000,00
b.	Skeið fyri tryggleikafólk, sum Arbeiðseftirlitið hevur skyldu at gera frálæru í trygd á arbeiðsplássum	kr. 25.000,00
c.	Skeið fyri málarar v.fl., sum nýta epoxy- og polyurethanevnir	kr. 18.000,00
d.	*Framsýning* Arbeiðseftirlitið ætlar aftur í ár at luttaka við framsýning av persónligari trygdarútgerð á komandi handilsstevnu av tí, at vit hava fingið prógv fyri tað positiva árin, hetta upplýsandi tiltak hevur.	
	Ætlaðar útreiðslur	kr. 18.000,00
Samlaðar útreiðslur fyri a, b, c og d.		kr. 115.000,00

ad. konto nr. 203308 Vegna størri virksemi innan skeið og aðra upplýsing v.m. verða hesar útreiðslur øktar til kr. 14.000,00

ad. konto nr. 203403 Hesar útreiðslur hava higartil verið konteraðar undir skrivstovuútreiðslur.
Stovnurin heldur tað verða ynskiligt við eini betri útgreining av rakstrarstaðnum.

ad. konto nr. 203507 Nýggj konto sum ein fylgja av avtalaðum samstarvi við okkara grannalond, serliga Danmark.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 12.000,00

ad. konto nr. 203507 Útreiðslurnar hertil vóru ov lágt settar seinasta fíggjarár. Ætlaðar útreiðslur hertil ..... kr. 17.000,00

ad. konto nr. 213806 Leiguútreiðslur:

Árlig leiga ..... kr. 113.000,-
Dýrtíðarhækkan ..... kr. 5.000,-
Árlig leiga ialt ..... kr. 118.000,00

ad. konto nr. 233051 Innbúgv

a. Í sambandi við frálæru í trygd á arbeiðsplássum er tørvur á ymiskari útgerð, so sum filmar, videobond v.m.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 12.000,00

b. Í okkara skrásetingararbeiði av virkjum bleiv hædd tikin fyri at fáa allar upplýsingar frá virkjum, so sum slag av arbeiði, arbeiðstól, tal av arbeiðsfólki, teknisk útgerð, vanlukkutilburðir v.m., skrásettar á ein slíkan hátt, at hesir lætt kunnu data-viðgerast.
Ein EDV-útgerð hevði eisini verið ein stór hjálp í umsitingini av tollmálum viðv. tekniskari útgerð til skip og teimum virðismetingum, stovnurin hevur um hendi.
Útreiðslur sambært tilboð ..... kr. 104.350,00

c. *Mátingartól:*
Arbeiðseftirlitinum tørvar tól til arbeiðshygiejniskar mátingar og tól til mátingar av gassi í olju-

tangum, áðrenn loyvi verður givið til at arbeiða í hesum.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 35.000,00

Samlaðar útreiðslur fyri a, b og c ..... kr. 151.350,00

ad. konto nr. 233155 *Prentlutir:*
Útreiðslurnar hertil øktar nakað vegna fleiri føroyskar reglugerðir, forskriftir og skeiðtilfar.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 55.000,00

ad. konto nr. 233259 Postgjald økt til ..... kr. 4.000,00

ad. konto nr. 233354 Telefon-telex. Vegna fleiri starvsfólk og meira samstarv við okkara grannalond verða hesar útreiðslur størri.
Ætlað ..... kr. 40.000,00

ad. konto nr. 233504 *Sakkøn hjálp:* Sambært avtalu við Landsstýrið fara vit at gera brúk av kønum fólki úti á teimum ymisku støðunum til at gera serlig eftirlitsarbeiði fyri okkum móti einari ávísari samsýning og at lata roknskapin fyri hesi arbeiðir ganga yvir hesa konto.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 12.000,00

ad. konto nr. 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur øktar til ..... kr. 40.000,00

ad. konto nr. 253467 Arbeiðseftirlitið krevur, at arbeiðarar nýta serliga verndarútgerð til ávís arbeiðir, tað veri seg trygdarskógvar, hjálmar, oyrnavernd, brillur, arbeiðsbúna v.m.
Neyðugt er, at eftirlitsmenn sjálvir ganga sum eitt gott dømi og nýta hesa útgerð, tá slík virkir verða vitjað.
Ætlaðar útreiðslur hertil ..... kr. 5.500,00

Ad §18-18152 Brandvenjingarstøð við Áir

Sbrt. skriv dagfest 2. november 1984:

Kontonummar og navn	Rokn-skapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot lands-stýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
Rakstrarstað 18152						
Konto nr. 253903						
Brandvenjingarstøðin við Áir	673.342,-	875.000	764.855	382.000	372.591	391.485

Sundurgreining og uppskot fram til 1987/88

Løn til støðleiðara	204.420,-	214.641,-	225.273,-
Løn tímalønt fólk	125.000,-	131.250,-	137.812,-
Hiti + el	25.500,-	26.700,-	28.300,-
Forskip (nýtt) í sambandi við maskinur v.m.	409.935,-	0	0
Íalt	764.855,-	372.591,-	391.485,-

Nevndin fyri Brandvenjingarstøðina vil hervið heita á fíggjarnevndina um at taka helvtina av nevndu upphædd — nevniliga kr. 382.242,50 — við á fíggjarlógina fyri 1985/86, og vilja vit so søkja tryggingarnar um at fíggja hina helvtina, eins og undanfarnu ár.

Kostnaðarætlan fyri stálkonstruktión, sokallaða forskip, í sambandi við verandi maskinhús.

60 pl. 2500 × 1000 × 8 mm	(160 kg/pl) á 744,00 kr. =	44.640,00 kr.	
50 pl. 3000 × 1000 × 8 mm	(192 kg/pl) á 892,00 kr. =	44.640,00 kr.	
36 pl. 3000 × 1000 × 6 mm dørkpl.	(153 kg/pl) á 743,58 kr. =	26.769,00 kr.	
130 m HEb 120	(26,7 kg/m) á 125,89 kr. =	16.366,00 kr.	
170 m HEb 100	(20,4 kg/m) á 96,19 kr. =	16.365,00 kr.	
Leytarar, rekkverk v.m.	.....	20.000,00 kr.	168.780,00 kr.
Tollur 25% av 168.780,00 =	.....		42.195,00 kr.

Frakt 32 tons á 530 kr/t =	16.960,00 kr.
Fundament (arb.løn + tilfar) =	100.000,00 kr.
Asfaltering uttan um maskinhús =	30.000,00 kr.
Arbeiðsløn (stálarbeiði) =	52.000,00 kr.
Forskip íalt	409.935,00 kr.

Ad § 18-18202 Bileftirlitið

Sbrt. skriv:

Kontonummar og navn		Roknskapur 1983/84	Játtan 1984/85	Uppskot stovnsins 1985/86	Uppskot landsstýris. 1985/86	Ætlan 1986/87	Ætlan 1987/88
83904	Ymiskar inntøkur	÷976.450,00	÷2.200,0	÷2.750,0	÷ 2.750,0	÷2.750,0	÷2.750,0
103143	Løn - starvsfólk	689.667,79	820,0	920,0	920,0	920,0	920,0
103222	Løn - reingerð	106.591,15	120,0	130,0	130,0	130,0	130,0
103288	Løn - onnur.....	493.387,65	625,0	650,0	650,0	650,0	650,0
103405	Løn - úrtíð	41.232,68	50,0	60,0	60,0	60,0	60,0
113202	Ferða- og dagpening. innl. .	91.839,80	150,0	150,0	150,0	150,0	150,0
113243	Ferða- og dagpen. uttanl. ..	36.932,00	0,0	0,0	0,0	0,0	0,0
123128	Eftirútbúgving	13.055,45	40,0	40,0	40,0	40,0	40,0
203308	Lýsingar	0,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
203403	Dagbløð, tíðarrit v.m.	2.675,50	2,0	4,0	4,0	4,0	4,0
213105	El, hiti og vask	68.156,23	70,0	80,0	80,0	80,0	80,0
213806	Leiguútreiðslur	270.435,96	320,0	330,0	330,0	330,0	330,0
233051	Innbúgv	9.659,60	20 0	20,0	20,0	20,0	20,0
233155	Prentlutir	13.560,00	20,0	50,0	50,0	50,0	50,0
233259	Postgjald	12.579,00	12,0	20,0	20,0	20,0	20,0
233354	Telefon og telex	46.149,00	65,0	80,0	80,0	80,0	80,0
233553	EDV-útreiðslur	88.300,00	100,0	120,0	120,0	120,0	120,0
233561	Aðrar skrivstovuútreiðslur .	22.476,72	30,0	40,0	40,0	40,0	40,0
255306	Amboð	133.762,42	150,0	200,0	200,0	200,0	200,0
253881	Hálkubreyt (í grunn)	500.000,00	500,0	1.000,0	750,0	750,0	750,0
253903	Aðrar útreiðslur	42.976,33	60,0	60,0	60,0	60,0	60,0
253928	Tænastuakfør, rakstur v.m.	46.089,60	60,0	100,0	100,0	100,0	100,0
353075	Bileftirlitið í grunn	100.000,00	1.000,0	3.000,0	1.500,0	1.500,0	1.500,0
		2.753.076,88	2.195,0	4.305,0	2.550,0	2.550,0	2.550,0

Viðmerkingar landsstýrisins:

Konto 253881 Hálkubreyt í grunn 750.000,- kr.

Konto 353075 Bileftirlitið í grunn 1.000.000,- kr.

Ad § 18-18216 Radioeftirlit

Sbrt. skriv dagfest 28. september 1984:

Vísandi til bræv landsstýrisins dagsett 10. august 1984 skulu vit mæla til, at settar verða kr. 310.000,00 á fíggjarløgtingslóg 1985/86 viðvíkjandi rakstrarstaði 18216/353209: *Radioeftirlitið.*

Nevnda upphædd verður mett at nøkta rakstur av Radioeftirlitinum í fíggjarárinum 1985/86, um onki óvanligt verður áfatt.

Tá ið stovnurin eisini verður biðin um ætlan fyri fíggjarárini 1986/87 og 1987/88, verður metingin gjørd við fyrivarni og út frá vanliga rakstrinum, ið ikki fevnir um keyp av nýggjum mátitólum.

Mett verður, at tørvur verður á
kr. 360.000,- fyri 1986/87 og
kr. 415.000,- fyri 1987/88.

Hjálagt ársfrágreiðing fyri 1983.

Radioeftirlitið
Ársfrágreiðing fyri árið 1983

Í hesum tíðarskeiði komu til stovnin 72 klagur um radioóljóð og 4 klagu um órógvan í sjónvarpsmóttakara. Hesar komu umframt úr Havn eisi v av Glyvrum, úr Vestmanna og úr Vági. Herumframt komu 12 klagur frá Tórshavnar radio um órógvan av ymiskum frekvensum har og ein klaga frá Vaktar- og Bjargingartænastuni um beribylgju, sum órógvaði neyðbylgjuna 121,5 kc.

Av teimum innkomnu klagunum vóru 8 um radioamatørar el. ''Walkie Talkies'', sum komu inn á ymisk tól, t.d. radio, plátu- og bandspælarar og í einum føri el-orgul.

Eftirlitið er eisini komið fram á óljóðskeldur, sum ikki klaga var um, t.d. frá ljósevnisrørum í krambúðum og frá leysum sambandi í el-lágspenningarlinjum.

Hesar óljóðskeldur eins og allar hinar klagurnar eru kannaðar og viðgjørdar. Tó eru 14 klagur ikki liðugt avgreiddar enn, meðan 4 klagur ikki eru avgreiddar vegna tess, at einki óljóð hevur verið, meðan kanningin er farin fram.

Óljóðskeldurnar eru í flestu førum av sama slag ár um ár, og í hesum tíðarskeiði hava tær verið hesar:

Háspenningarlinja — vánaligt samband
Transformatortorn — vánaligt samband v.m.
Oljukyndingar — her kann verða talan um óljóð frá neista, termostati ella mekaniskum breki
Ljósevnisrør — bæði gomul og nýggj
Ferðsluljós — við gonguteigar
Gøtuljós
Reklamaskelti
El-hegn
Frystiboksir og -skáp
Elektronisk tól — við thyristorum
Fotokopieringsmaskinur
El-installatiónir — vánaligt samband
Grótsagimaskina
Ávísrotatiónir — prentsmiðjur
Termostatar
Radioamatørar og Walkie Talkies
Neyðsendari í gummibáti

Viðvíkjandi neyðsendaranum, sum áhaldandi sendi á 121,5 kc alla náttina, fekk radioeftirlitið ikki boð um hetta fyrrenn kl. 09.30 (13/12-83) frá Vaktar- og Bjargingartænastuni. Tól vóru riggað til at peila við, men longu kl. 09.40 varð alt avblást, tá ið bjargingarbátur varð funnin upp-brotin á Álakeri.

Fyri Tórshavn radio varð umfatandi kanningararbeiði gjørt í sambandi við áhaldandi óljóð á 500 kc — 2069 kc og 2185 kc. Peilingin vísti til økið við el-verkið í Gundadali, og við hjálp frá S.E.V. — við at útihýsa ymiskum háspenningarlinjum til og frá Havnini, varð funnið fram til, at óljóðs-keldan var á Sundi. Við nærri kannan varð funnið fram til brekið, sum var uttan fyri eitt transformator-hús sunnan fyri el-verkið.

Í sambandi við radioóljóð frá 2 prentsmiðjum (dagbløð) og einum grótvirki (thyristorstýrd) bóðu vit um tekniska vegleiðing frá D.R.-radio-

støjtjeneste. Tage Snorgaard, skrivstovustjóri — fyrrverandi radioinspektørur — kom í apríl mánaði til Havnar at kanna málið, og hevði hann mátitól við. Mátingar og annað kanningararbeiði varð gjørt í øllum trimum støðum, og tosað varð við eigararnar. — Mátingarúrslit og annað varð tikið heim við til D.R.radiostøjtjenesten til viðgerðar, og síðan vóru uppskot og annað tilfar um óljóðdoyvan av hvørjari óljóðkeldu sær sent okkum aftur til støðutakan.

Eitt tól er í hesum tíðarskeiði keypt til mátingar á AM og FM økinum og til mátingar av antennum. Hetta er av merkinum Hirsmann — RPM 2000.

Hóast fólk senda inn klagur um radioóljóð, hendir tað seg framvegis, at nøkur ikki hava móttakarasíðuna í lagi — tað er antenna ella radiotól. — Í hesum tíðarskeiði varð komið fram á 3 við ongari antennu, 5 við vánaligari antennu, hjá 2 var antennan í ólagi og í 2 førum var radio í ólagi.

— — — — — — —

Viðmerking landsstýrisins:
Uppskot landsstýrisins er at játta kr. 310.000,-.

Ad § 18-18235 Ráðið fyri ferðslutrygd

Sbrt. skriv dagfest 17. oktober 1984:

Ráðið fyri Ferðslutrygd loyvir sær hervið at heita á Føroya Landsstýri um, at tað í fíggjarárinum **1985-86** verða játtaðar ráðnum **kr. 782.500,-** til arbeiði tess og rakstur av skrivstovuni.

Ráðið hevur eisini sent Tryggingarsambandinum Føroyar umsókn um somu upphædd.

Samlaðu útreiðslurnar eru mettar til kr. 1.595.000,-. Tær seinastu kr. 30.000,- metir ráðið at kunna fáa inn við limagjaldi frá kommunum og øðrum.

Víst verður annars til viðløgdu skjøl.

Tilskot frá landinum	kr. 782.500,00
Tilskot frá Tryggingarsambandinum	kr. 782.500,00
Tilskot frá kommunum	kr. 30.000,00

Útreiðslur:

a.	Lønir	kr. 270.000,00	
